# FRÆLST FÓLK Í FRÆLSUM LANDI



TJÓÐVELDI

# Stevna og Stevnumið

Samtykt á eykaflokstingi í Suðurstreymoy 10. mai 2014

Tjóðveldi

# FRÆLST FÓLK
# Í
# FRÆLSUM LANDI

Stevna og stevnumið Tjóðveldis
Samtykt á eykaflokstingi í Suðurstreymoy
10. mai 2014

# Innihaldsyvirlit


**Tjóðveldisstevnan** 5

**Um stevnumiðini hjá Tjóðveldi** 7

**Tjóðveldishugsjónin** 8

Tjóðveldi merkir fólkaræði 8
Veruligt frælsi og ábyrgd 8
Frælsi, fólkaræði, javnrættindi, samhaldsfesti og burðardygd 10
Hugsjónarliga vágskálin 10

**Frælsar Føroyar – frælst fólk** 11

Okkara rættindi sum tjóð 11
Altjóða fólkarættur 11
Skipað loysing og tjóðfundarleiðin 12
Sjálvberandi búskapur 12
Grundlóg Føroya. 12
Rættartrygd, lógir og almenn fyrisiting 13
Dómstólar 14
Kommunur 14

**Varandi virðir í sjálvberandi búskapi** 15

Búskapar- og fíggjarrpolitikkur 15
Búskapargrunnur Føroya 16
Skatta- og avgjaldspolitikkur 17
Tilfeingis-, vinnu- og samferðslugjøld 17

**Fjøltáttað og nýskapandi vinnulív** 18

Vinnupolitikkur 18
Matkovin í Norðuratlantshavi 19
Fiskivinnupolitikkur 19
Alivinna 21
Landbúnaður 22
Ferðavinna, matstovuvinna og aðrar tænastuvinnur 23
Kreativar og “nýggjar vinnur” 24
Sjó-, frálanda- og oljuvinna 24
Greiðar linjur millum alment og privat 25
Frælsur og væl skipaður arbeiðsmarknaður 25

**Somu rættindi – somu møguleikar** 26
Vælferðarpolitikkur 26
Almenn forsorg 26
Almanna- og heilsupolitikkur 27
Fólkaheilsa 28
Eitt samstarvandi og samanknýtt heilsuverk 28
Inklusjónspolitikkur 29
Barnavernd 30
Eldrapolitikkur 30
Pensjónsskipan 31
Arbeiðsmarknaður og trivnaður 32
Bústaðar- og íbúðarpolitikkur 33

**Ein lærandi og vitandi tjóð** 34
Útbúgving fyri øll og lívslong læra 34
Barnagarður og forskúli 35
Fólkaskúlin 35
Eftirskúli og háskúlar 36
Miðnámsskúlar 37
Musikkskúli 38
Hægri skúlar og altjóða lærdómssseturAltjóða universitet 38
Gransking og altjóða samstarv 39

**Skapandi mentan og list** 40
Mentanar- og listapolitikkur 40
Mentanar- og listaráð Føroya 41
Mál og bókmentir 41
Skapandi list og mentan 41
Mentanarstovnar 42
Tjóðleikhús og symfoniorkestur 43
Bókasøvn 43
Felagslív og livandi mentan í gerandisdegnum 44
Ítróttur 45

**Burðardyggar Føroyar** 46
Náttúru- og umhvørvispolitikkur 46
Orkupolitikkur – grøna gullið 47

**Størri og samanbundnar Føroyar** 48
Økismenning 48
Lands- og økisætlan 49
Eitt fulfíggjað samferðslu- og samskiftisnet 49
Útoyggjar og smábygdir 49

**Altjóða miðdepil í Norðuratlantshavi** 51
Uttanríkispolitikkur og fullveldi 51
Ein grønur miðdepil í Norðuratlantshavi 51
Samgonga í Norðuratlantshavi 51
Norðurlandasamstarv 52
Evropapolitikkur 52
Altjóða samstarv 53
Menningarsamstarv 53
Trygdar- og verjumál 53

**Vit byggja land** 54
Tjóðarbygging 54
Frá-og tilflyting 54
Útlendingapolitikkur 55
Javnstøðupolitikkur 56
Javnstøða og rættindi hjá minnilutum 57
Fjølmiðlapolitikkur 58
Ungdómspolitikkur 58

# Tjóðveldisstevnan

Stevna Tjóðveldisfloksins, sum varð samtykt á stovningarfundi 22. og 23. mai 1948, er ein tíðarleys stevna. Hon byggir á altjóða og algild virðir og mál og er eins galdandi í dag, og tá hon varð samtykt.

## Stevna Tjóðveldisfloksins

**1.**

Føroyska tjóðveldið verður stovnsett við fólkaræði í politiska, vinnuliga, sosiala og mentanarliga lívi landsins. Einki útlendskt vald eigur nakran rætt til ræði og ognir í landinum. Føroyar verða loystar úr øllum útlendskum bondum, soleiðis sum føroyska tjóðin avgjørdi á fólkaatkvøðuni 14. september 1946. Heldur ikki eigur nakar einstaklingur ella nøkur serstøk stætt framíhjárætt til vald landsins og ognir. Føroyingar allir eiga somu samfelagsrættindi og hava somu samfelagsskyldur.

**2.**

Politiska lív landsins verður grundað á satt fólkaræði. Valdið er fólksins, og teir, sum røkja størv í umboði fólksins, skulu í øllum lutum standa fólkinum til svars fyri gerðir sínar í hesum størvum. Tað verður at menna fólkið og vekja ans tess og áhuga fyri landsviðurskiftum og landsmálum.

**3.**

Til tess at tryggja og økja inntøkur fólksins sum heild verður at leggja ætlan fyri uppbygging framleiðsluútbúnaðarins og uppdyrking landsins, at samskipa vinnulívsstarv einstaklinga og hins almenna, at bøta um og fremja yrkiskunnleika og vinnulívssermentan, at nýta bestu og fullkomnastu amboð og framleiðsluhættir og at troyta vinnulívsmøguleikar, sum enn liggja á láni í fiskiskapi, landbúnaði, ídnaði, fossamegi og sigling.

Uttanlandshandilin allur, innflutningur og útflutningur eins og peningamál, bankamál og gjaldoyrismál, verða heilt at koma undir eftirlit og umsjón samfelagsins.

**4.**

Fólkið, sum starvar í framleiðsluni, jarðarmenn, fiskimenn og verkamenn eins og tænastufólk, eiga rættvísa løn fyri starv sítt.

**5.**

Í skattamálum – beinleiðis og óbeinleiðis – verður hitt almenna at leggja rættvísan skatt á samfelagslimirnar. Tað almenna stendur til svars fyri, at skattauppgávan verður bein.

**6.**

Øllum teimum, sum av sjúku, elli, óhappi ella vinnuloysi eru ikki før fyri at bjarga sær og sínum, verður veitt fullkomin hjálp og stuðul. Eingin eigur at koma í neyð ella undir vánalig kor av hesum orsøkum.

**7.**

Grundarlagið undir mentan fólksins er bøttur barnaskúli. Øll børn hava rætt og skyldu til ókeypis framhaldslærdóm, annaðhvørt almennan lærdóm ella serstakan yrkislærdóm. Hægri skúlar, studentaskúli og lærdur háskúli, søvn og aðrir mentanarstovnar, kostað av samfelagnum, bera hægri mentan landsins og vísindi. Fátækt og fjarbýli eiga ikki at forða evnaligum ungfólki lærdóm og mentan. Mentamonnum, vísindamonnum og listamonnum tjóðarinnar verða tryggjað sømilig kor og líkindi at røkja størv síni.

**8.**

Sum tjóð í frælsum landi taka føroyingar lut í altjóðasamstarvi um slík mál, sum týdning hava fyri tjóðina.

**9.**

Tað verður at fara undir dyggiligt endurreisingarstarv og uppbyggingarstarv á øllum økjum samfelagsins, so at fólkið alt, sum her veksur upp, fær líkindi at liva við sømd í føðilandi sínum.

# Um stevnumiðini hjá Tjóðveldi

Tjóðveldishugsjónin og tjóðveldismálini skulu útinnast støðugt á teimum ymsu mótunum í samfelagnum: Í stjórnmálum, landspolitikki og altjóða samstarvi. Í kommunalum og lokalum arbeiði. Í fakfeløgum, vinnufeløgum, áhugafeløgum og felagsskapum. Í mentanararbeiði, í orðaskifti og í gerandislívinum sum heild.

Stevnan hjá flokkinum er hugsjónarliga grundarlagið og høvuðsmálini, ið ikki verða broytt. Stevnumiðini eru ítøkiligi politikkurin, sum skal fremja stevnuna og málini í verki í dagsins samfelag.

Stevnumiðini verða tí dagførd og endurskoðað við jøvnum millumbilum. Ein røð av fólki og bólkum hava sambært samtykt á flokstingi í Tórshavn 2013 arbeitt við at orða og viðgera stevnumiðini. Síðan hevur uppskot verið viðgjørt á eykaflokstingi í Haraldssundi í november 2013, og aðalstjórnin í flokkinum hevur valt eina ritstjórn.

Eftir framløgu á flokstingi í Sandavági 28. og 29. mars 2014 hevur uppskotið verið sent øllum økisfeløgum floksins. Allir partar í flokkinum og øll tjóðveldisáhugað hava havt møguleika viðgera og viðmerkja uppskotið. Á eykaflokstingi 10. mai 2014 vórðu viðmerkingar, broytingaruppskot og uppískoyti frá feløgum og tjóðveldisáhugaðum samtykt og viðmerkt til hesa endaligu útgávuna.

Stevnumiðini verða sett upp í 11 partar:

**Tjóðveldishugsjónin**

**Frælsar Føroyar – frælst fólk**

**Varandi virðir í sjálvberandi búskapi**

**Fjøltáttað og nýskapandi vinnulív**

**Somu rættindi – somu møguleikar**

**Ein lærandi og vitandi tjóð**

**Skapandi mentan og list**

**Burðardyggar Føroyar**

**Størri og samanbundnar Føroyar**

**Altjóða miðdepil í Norðuratlantshavi**

**Vit byggja land**

# Tjóðveldishugsjónin

## ● Tjóðveldi merkir fólkaræði ● Veruligt frælsi og ábyrgd ● Frælsi, fólkaræði, javnrættindi, samhaldsfesti og burðardygd ● Hugsjónarliga vágskálin

Tjóðveldi er ein hugsjón, ein rørsla og ein politiskur flokkur, sum stríðist fyri at skipa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt og frælst land í heiminum við fólkaræði og javnrættindum fyri alt fólkið í landinum. Í Tjóðveldi savnast fjølbroytt og ymisk fólk um eina hugsjón og um grundleggjandi virðir, mannarættindi og mál, sum skulu fremjast.

**Tjóðveldi merkir fólkaræði**

Í stevnu floksins verður sagt í fyrstu grein: "Føroyska tjóðveldið verður stovnsett við fólkaræði í politiska, vinnuliga, sosiala og mentanarliga lívi landsins. Einki útlendskt vald eigur nakran rætt til ræði og ognir í landinum. Føroyar verða loystar úr øllum útlendskum bondum, soleiðis sum føroyska tjóðin avgjørdi á fólkaatkvøðuni 14. september 1946. Heldur ikki eigur nakar einstaklingur ella nøkur serstøk stætt framíhjárætt til vald landsins og ognir. Føroyingar allir eiga somu samfelagsrættindi og hava somu samfelagsskyldur."

Tjóðveldi merkir sostatt fólkaræði. At tjóðin – fólkið – hevur valdið. Og at fólkaræði og javnrættindi eru galdandi í øllum samfelagsins lutum.

Javnrættindi skulu vera millum tjóðir til at taka egnar avgerðir og at stjórna egnari framtíð og egnum tilfeingi. Og hetta er óloysiliga samantengt við, at somu javnrættindi skulu galda millum fólkið, ið er tjóðin: Frælst fólk í frælsum landi, har øll eiga rættin at liva og virka við sømd og javnbjóðis treytum.

Grundvirðið hjá Tjóðveldi er, at øll eiga sama rætt og sama frælsi at velja, virka og mennast, tað veri seg í politikki, í sínum lívsvalum, í vinnu, í útbúgving, í mentan og í sosialum viðurskiftum, sama um vit eru kvinnur ella menn, ung ella eldri, rík ella fátøk, bera brek ella sjúku, búgva ymsastaðni í landinum, hava ymsan húðarlit, uppruna, trúgv og áskoðan, og sama hvussu vit eru fødd í hendan heim og hava valt at liva okkara lív.

**Veruligt frælsi og ábyrgd**

Tjóðveldi byggir á eina fevnandi frælsishugsjón. Mótsett útihýsandi frælsisfatanum, har frælsi verður fatað sum frælsi **FRÁ** at taka ábyrgd og á, at frælsi hjá einum er bygt á mist frælsi hjá øðrum, byggir Tjóðveldi á, at frælsi er ábyrgd og verður vunnið í felagsskapi, og at okkara frælsi er treytað av frælsinum hjá næstanum.

Hetta frælsið er frælsi **TIL** at taka egnar avgerðir, at standa við tær og til svars fyri tær. Tað er frælsi til at virka saman við øðrum á jøvnum føti. Hendan fevnandi frælsishugsjónin, har fólk í felag taka ábyrgd av at skapa felags kor, rættindi og

møguleikar, hevur skapt øll verulig framstig í heiminum, og hendan frælsishugsjónin hevur skapt alt tað, sum er okkum dýrabart: Mentan, mál og virði, vinnumøguleikar, rættin til okkara tilfeingi, javnrættindi, vælferð og trivnað, skúla og útbúgving, vegir og samferðslu – umframt hug, dirvi og sømd í okkara egna landi.

Tjóðveldishugsjónin byggir sostatt á:

**Tjóðskaparligt og politiskt frælsi:** Føroyingar eiga sama rætt og frælsi sum aðrar tjóðir at velja, virka og mennast í heiminum. Vit skulu samstarva við hvønn, vit vilja, og taka somu ábyrgd í heiminum sum onnur. Okkara mál, mentan og samleiki skulu virðast og mennast á jøvnum føti við onnur. Øll eiga rættin at taka avgerðir og at skipa seg í felag og soleiðis hava ávirkan á samfelagið og egið lív.

**Persónligt frælsi:** Hvør einstakur eigur sama rætt og frælsi til at velja, virka og mennast, um vit taka við somu skyldum og ikki gera okkum inn á frælsið hjá øðrum.

**Sosialt frælsi:** Frælsi og samhaldsfesti eru samantvunnin. Vit hava felags ábyrgd at tryggja øðrum somu rættindi, frælsi og møguleikar og rættin at skipa okkum í felag.

**Vinnuligt og fíggjarligt frælsi:** Ongin stætt ella einstaklingur eigur framíhjárættindi í samfelagnum. Øll eiga rætt at taka lut og at bjóða seg fram eftir somu treytum til at vinna og skapa úr samfelagsins tilfeingi og møguleikum.

Fyri Tjóðveldi er tjóðskaparligt, politiskt, persónligt og sosialt frælsi sostatt fortreytin fyri fíggjarligum og búskaparligum frælsi. Tá vit taka ábyrgdina og vinna okkum somu rættindi og møguleikar at taka egnar avgerðir, kunnu vit skapa veruligt fíggjarligt og búskaparligt frælsi. Henda hugsjónin ger upp við hugsanina um, at fyrst skal fíggjarligt frælsi vera, og síðan kunnu vit taka ábyrgd og fáa somu rættindi og møguleikar. Var tann hugsanin galdandi allastaðni, hevði ongin tjóð, ongin persónur ella nakar samfelagsbólkur vunnið sær sjálvstøðu og rættindi.

Søguliga byggir Tjóðveldi hinvegin á ta sannroynd, at tá tjóðir hava vunnið sær frælsi og javnrættindi, hava tær ment sítt fíggjarliga og búskaparliga frælsi. Tá samfelagsstættir hava vunnið sær politiskt frælsi og rættindi, hava tær broytt sínar umstøður og vunnið sær fíggjarligan framburð, og tá einstaklingar og samfelagsbólkar hava vunnið sær myndugleika og somu rættindi, hava teir ment sínar fíggjarligu møguleikar.

**Frælsi, fólkaræði, javnrættindi, samhaldsfesti og burðardygd**
At fremja tjóðveldishugsjónina, virðini og málini er ongantíð eitt liðugt ella avmarkað verk. Frælsi skal skapast, tryggjast og endurskapast hvønn dag, um tað skal hava veruligt og varandi virði.

Í stevnu floksins og í stevnumiðunum ganga hesi hugsjónarligu virði – sum hava alheims gildi – aftur í øllum teimum politisku hjartamálunum og ítøkiliga politikkinum:

- Frælsi
- Fólkaræði
- Javnrættindi
- Samhaldsfesti
- Burðardygd

Harumframt liggur málið um at menna føroyskar førleikar í einum nútímans, altjóða heimi sum ein áhaldandi drívmegi undir øllum tí politiska arbeiðinum.

Hesi grundvirði og mál binda politikkin hjá Tjóðveldi saman á øllum økjum: Í tjóðskaparmálum, í altjóða samstarvsmálum, í rættindamálum, í búskaparpolitikki, í vinnumálum, í sosial- og heilsupolitikki, í mentanarmálum, í útbúgvingar- og granskingarmálum, í umhvørvis- og orkumálum, í økismenning, í ungdómspolitikki o.s.fr.

## Hugsjónarliga vágskálin

Tjóðveldi vigar sostatt støðugt síni politisku mál og sínar ítøkiligu avgerðir á hesi hugsjónarligu vágskál:

Fremur tað fullveldi fyri tjóðina?
Fremur tað frælsi fyri øll?
Fremur tað fólkaræði?
Fremur tað javnrættindi hjá øllum?
Fremur tað samhaldsfesti?
Fremur tað burðardygd?
Fremur tað føroyskar førleikar í einum nútímans heimi?



# Frælsar Føroyar – frælst fólk

## ● Okkara rættindi sum tjóð ● Altjóða fólkarættur ● Skipað loysing ● Sjálvberandi búskapur ● Grundlóg Føroya ● Rættartrygd, lógir og almenn fyrisiting ● Dómstólar ● Kommunur

### Okkara rættindi sum tjóð

Føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og vit lúka allar tær søguligu, politisku, mentanarligu og búskaparligu fortreytirnar fyri at skipa okkum sum sjálvstøðugt land og frælsa tjóð í heiminum. Føroyska tjóðin hevur ongantíð givið sín sjálvsavgerðarrætt frá sær ella samtykt at lata vald ella ognarrætt til nakra aðra tjóð ella vald. Tvørturímóti. Bara einaferð er føroyska tjóðin spurd á fólkaatkvøðu – 14. september í 1946 – har roynt varð at trýsta fólkið til at geva frá sær okkara rættindi. Men føroyingar valdu loysing og frælsi.

Tær lógir og tær skipanir, ið hava verið settar í verk í Føroyum um okkara ríkisrættarligu støðu, okkara tjóðarrættindi og sjálvsavgerðarrætt, hevur fólkið ikki samtykt, og tær hava tí onki fólkaræðisligt gildi.

### Altjóða fólkarættur

Í grundarlagnum at skipa Føroyar frælsar byggir Tjóðveldi á stovningarsáttmálan hjá Sameindu Tjóðum (ST) og á ST-sáttmálarnar um borgarlig og stjórnmálalig rættindi og um búskapar-, samfelags- og mentanarrættindi. Har verður m.a. staðfest, at:

- Allar tjóðir hava sjálvsavgerðarrætt. Við heimild í hesum rætti hava tær frítt at taka avgerð um stjórnarrættarligu støðu sína og frælst at fremja búskapar-, samfelags- og mentanarmenning sína.
- Allar tjóðir kunnu til sítt egið gagn frælst ráða yvir náttúruríkidømi sínum og tilfeingi, skerjir tað ikki skyldur bundnar í millumtjóða búskaparsamvinnu. Á ongum sinni kunnu verða tikin frá eini tjóð ráðini at bjarga sær sjálvari.
- Tey ríki, sum eiga lut í hesum semingi, teirra millum tey, sum hava ábyrgd av at sita fyri umveldum, ið ikki ráða sær sjálvum, og tilsjónarumveldum, skulu stuðla til at fremja sjálvsavgerðarrættin.

Øll norðurlond hava undirritað hesar sáttmálar. Tjóðveldi virkar í norðurlendskum samstarvi fyri, at Norðurlond viðurkenna og stuðla frælsisrættindunum hjá føroyingum og øllum teimum norðurlendsku tjóðunum, ið ikki hava útint sín sjálvsavgerðarrætt.

**Skipað loysing og tjóðfundarleiðin**

Tjóðveldi leggur dent á eina skipaða loysing. Allar fyrireikingar og samráðingar um ítøkilig mál eru framdar til tess at fremja eina væl skipaða loysing í Føroyum, sum verður kjølfest í fólkaatkvøðum um tilgongdina og leiðina.

Tjóðveldi vil skipa tilgongdina soleiðis:

1. Grundlóg Føroya verður løgd til almenna viðgerð og til fólkaatvøðu. Hetta verður gjørt eftir tjóðfundarleiðini:

   **Tjóðfundarleiðin**

   - Eitt ávíst tal av fólki (30-50 tilsamans) úr øllum økjum í landinum verða vald á beinleiðis vali til at vera umboð á tjóðfundinum fyri ymsu økini.
   - Tjóðfundurin hevur almennar fundir í øllum pørtum av landinum, har øll kunnu siga sína hugsan og fáa ávirkan.
   - Tjóðfundurin ger endaligt uppskot til grundlóg, sum síðan verður lagt til bindandi fólkaatkvøðu.
2. Heildarveitingin úr Danmark verður sett í Búskapargrunn Føroya, og umvegis grunnin verður hon stigvíst minkað burtur.
3. Uttanríkismál, verjumál, útlendingamál, loftferðslumál, persóns- og familjurættarmál verða skipað undir føroyskum ræði, og føroysk lestrarstuðulsskipan til øll føroysk lesandi verður sett í verk.
4. Løgregla, rættarskipan, gjaldoyramál, peningamál, fíggingarvirksemi og ríkisborgararættindi verða skipað undir føroyskum ræði.
5. Samráðingar verða framdar við donsku stjórnina um framtíðar samstarv millum tvær javnsettar tjóðir sambært altjóða fólkarætti. Fráboðan til altjóða samfelagið um, at Føroyar verða skipaðar sum sjálvstøðug tjóð, verður løgd til fólkaatkvøðu í Føroyum.

**Sjálvberandi búskapur**

Tjóðveldi hevur lagt fram væl grundað og fíggjarliga kjølfest uppskot til miðvíst at gera okkum leys av veitingunum uttanífrá og at skipa ein sjálvberandi búskap.

Hetta kann fremjast við eini skiftisskipan, har inntøkuvøkstur landsins og minkingin av donsku ríkisveitingini verða knýtt saman. So hvørt inntøkur landsins vaksa, fara 50% av inntøkuvøkstrinum til at minka ríkisveitingina á fíggjarlógini, meðan 50% av inntøkuvøkstrinum fara inn á fíggjarlógina. Hetta verður gjørt umvegis Búskapargrunn Føroya. Við hesum leisti verður landsins fíggjarlóg óheft av donsku ríkisveitingini eftir 6-8 árum.

**Grundlóg Føroya**

Føroyska fólkið hevur evsta valdið í Føroyum. Grundarlagið undir fólkaræðinum

verður skjalfest í egnari grundlóg. Í Grundlógini verða frælsisrættindini, mannarættindini og javnrættindini hjá tjóðini og hjá hvørjum einstøkum samfelagsborgara lógarfest.

**Grundlógin skal m.a.:**

- Tryggja øllum íbúgvum landsins javnbjóðis rættindi og skyldur, persónligt frælsi, sosial rættindi, rætt til útbúgving, arbeiði og rættartrygd.
- Tryggja eitt greitt valdsbýti, og at allir valdsstovnar landsins verða lagdir undir fólksins ræði og ábyrgd.
- Áseta minnilutaverju í bæði parlamentarisku skipanini og fyri samfelagsbólkar.
- Áseta reglur og skyldur um vernd av landsins tilfeingi, og at tilfeingið er fólksins ogn, áseta rættindi til innløgu, umhvørvisvernd og verju fyri, at fólkaræðið ikki kann missast, og áseta kommunalt sjálvræði, alment gjøgnumskygni og verju av fíggjarliga fæi landsins.
- Tryggja, at øll fólksins umboð hava rættarliga ábyrgd og standa til svars fyri sínum avgerðum.
- Áseta, at fólksins vald verður styrkt við beinleiðis fólkaræði, har ávíst tal av veljarum við undirskriftum kann krevja mál viðgjørt og gjørt av á tingi. Ella kann krevja mál lagt beinleiðis til fólkaatkvøðu.

**Rættartrygd, lógir og almenn fyrisiting**

Til tess at skipa eitt livandi fólkaræði við frælsi og rættindum hjá øllum krevst av føroyskum myndugleikum, at teir standa til svars mótvegis fólkinum og føroysku grundlógini og útinna fólkaræði í verki í øllum sínum avgerðum.

*Tjóðveldi vil*

- Færri lógir, har dentur verður lagdur á yvirskipaðar lógir um rættindi og skyldur á ymsu samfelagssøkjunum og ikki á smálutastýring.
- Lógarverkið skal endurskoðast til tess at skapa føroyskan lóggávusið, ið leggur dent á endamálsorðingar í lógunum, at tær verða gjørdar til tørvin og fortreytirnar í føroyska samfelagnum, at tær verða einfaldar at umsita, og at tær verða orðaðar til almenningin.
- Mótvegis fyrisitingini skal ein grannskoðaraskipan setast í verk, ið skal tryggja, at lógir, sáttmálar og uppskot veruliga verða framd og útint sambært samtyktum.
- Opinleiki og víðfevnt alment innlit skal tryggjast í fyrisitingini og avgerðir hjá dómsvaldi.
- Almenni bygnaðurin skal endurskoðast, gerast einfaldur og lagast til føroyskar fortreytir og viðurskifti.

- Sakkunnleiki og tænastur skulu savnast og virka saman í tvørgangandi uppgávum – eitt nú fíggjar- og roknskaparstýring, løgfrøðitænasta, journalskipanir, kæruviðgerð o.a.
- Rætturin og skyldan hjá starvsfólki at gera vart við óreglusemi í fyrisitingini verður ásettur við lóg.
- Føroysk løgfrøði- og fyrisitingarútbúgving verður skipað á hægsta stigi.
- Allar avgerðir í umsitingini og øll umsiting av almennum peningi skal verða lætt atkomulig hjá almenninginum at kunna seg við. Skylda er hjá myndugleikunum at kunna um avgerðargrundarlag, kærumøguleikar o.a.
- Hoyringsrættur og alment orðaskifti um lóggávu og rættarskapandi avgerðir skulu vera regla.
- Løgtingsins umboðsmaður verður grundlógarfestur sum fólksins umboðsmaður og fær neyðugar umstøður at útinna sín leiklut.

### Dómstólar

Føroyar verða skipaðar við dømandi valdi, sum minst er í tveimum stigum. Sambært altjóða sáttmálabindingum hava íbúgvar landsins eisini atgongd til altjóða dómstólar og kærumøguleikar.

Føroyska rættarskipanin verður javnan eftirmett, har heitt verður á altjóða stovnar um at meta um rættartrygd og mannagongdir.

### Kommunur

Tjóðveldi leggur dent á kommunala sjálvræðið sum týðandi tátt í fólkaræðinum. Landið skal skipast í størri kommunalar eindir ella samstørv, sum hava møguleika at mennast í rímiligari javnvág og kunnu bjóða tænastur á sama stigi til borgararnar.

Skattaskipanin verður endurskoðað soleiðis, at ein stigvaksandi skattaskipan og útjavningarskipan kann galda fyri allar borgarar og geva møguleika hjá kommunum at átaka sær størri uppgávur.

Eftir somu treytum sum til løgtingsval skulu lesandi útisetar hava atkvøðurætt til kommunuval.

# Varandi virðir í sjálvberandi búskapi

## ● Búskapar- og fíggjarpolitikkur ● Búskapargrunnur Føroya ● Skatta- og avgjaldspolitikkur ● Tilfeingis-, vinnu- og samferðslugjøld

Høvuðsmálið í búskapar- og fíggjarpolitikkinum hjá Tjóðveldi er sjálvbjargni fyri bæði land og fólk og at fremja javnbjóðis møguleikar hjá øllum fólkinum í landinum at skapa varandi virðir, vælferð og trygd undir sínum lívi og dreymum. Sum menniskju og sum tjóð skulu vit kunna virka sjálvbjargin og fræls við ábyrgd í samfelagnum og í heiminum. Í felag hava vit ábyrgdina av at tryggja møguleikarnar hjá øllum – bæði verandi og komandi ættarliðum – til at skapa og gagnnýta virðini og tilfeingið í samfelagnum og støðugt lata samfelagið í betri standi til eftirkomarar okkara.

Tess fleiri fólk kunnu skapa, virka og liva við somu møguleikum og skyldum, tess ríkari og fjølbroyttari verða samfelagið og búskapurin. Búskapur og búskaparvøkstur, sum byggja á stættarmun, ovurnýtslu, ovurtroyting av tilfeingi, fíggjarliga spekulasjón, veitingar uttanífrá og á, at virðini verða savnað á fáum hondum, skapar bert ójavna, afturvendandi kreppur og ger øll fátækari.

Búskapurin og búskaparvøkstur skulu grundast á varandi virði og veruliga virðisskapan, tvs. tilfeingi, framleiðslu, tænastur, skapan og arbeiði hjá fólkinum í landinum, og búskapurin er óheftur av fíggjarligari veiting úr útlondum.

### Búskapar- og fíggjarpolitikkur

Búskapar- og fíggjarpolitikkurin skal tryggja ein sjálvberandi búskap, ið byggir á samhaldsfesti, javnbjóðis møguleikar og burðardygga umsiting av tilfeinginum til frama fyri verandi og komandi ættarlið. Búskapar- og fíggjarpolitikkurin skal virka konjunkturjavnandi og stuðla upp undir burðardyggan vøkstur.

Tjóðbanki Føroya, Búskapargrunnur Føroya, arbeiðsloysisskipanin, pensjónsskipan og aðrar trygdarskipanir skulu saman við einum ábyrgdarfullum og konjunkturjavnandi fíggjarpolitikki virka sum brimgarðar, ið kunnu javna sveiggj í búskapinum og tryggja eina støðuga menning av einum sjálvberandi føroyskum búskapi.

*Tjóðveldi vil*

- Verandi ríkisveiting verður miðvíst minkað burtur av fíggjarlóg landsins og tikin úr føroyska búskapinum. Búskapargrunnur Føroya kann nýtast sum amboð í eini skiftisskipan.
- Tjóðbanki Føroya verður stovnaður og skal tryggja óhefta umsiting av landsins ognum og skuld, gera tjóðarbúskapargreiningar og hava tjóðarbúskaparligt eftirlit.
- Hagstova Føroya skal tryggja, at øll viðkomandi hagtøl um samfelagið og búskapin eru tøk.

- Langtíðarætlan skal gerast fyri bæði rakstur og íløgur landsins.
- Greitt ábyrgdarbýti og avtalur skulu gerast millum land og kommunur um íløgur og rakstur.
- Fult gjøgnumskygni skal valda, har allar ognir, inntøkur og útreiðslur eru partar av roknskapi landsins.
- Framkomið eftirlit skal vera við landsins og kommunalum fíggjarviðurskiftum.
- Landsgrannskoðanin skal tryggjast fullgóðar umstøður at virka, og tilmæli skulu setast í verk.
- Fríhandils- og handilssáttmálar skulu tryggja føroyingum kappingarføra støðu í alheims høpi.
- Føroyar skulu vera partur av størri gjaldoyarøki.
- Grundleggjandi búskaparstovnar landsins skulu staðfestast í Føroya grundlóg.

**Búskapargrunnur Føroya**

Búskapargrunnur Føroya skal nýtast sum amboð at tryggja eina støðuga menning av føroyska búskapinum og at javna serinntøkur, ið ikki eru varandi, tvørtur um ættarlið. Eisini kann grunnurin nýtast sum amboð til miðvíst at minka ríkisveitingina burtur úr føroyska búskapinum.

*Tjóðveldi vil*

- Allar serinntøkur landsins – eitt nú frá kolvetni og møguligum einskiljingum – verða settar í grunnin.
- Ognirnar verða umsitnar soleiðis, at inntøkurnar frá hesum gerast varandi fyri verandi og komandi ættarlið.
- Realavkastið frá innistandandi í grunninum kann nýtast til átøk, sum eru íløgur í framtíðina – eitt nú útbúgving, gransking og mentan – umframt nýtast sum konjukturjavnandi amboð.
- Búskapargrunnurin kann nýtast sum amboð til at minka ríkisveitingina burtur av fíggjarlóg landsins og úr búskapinum.
- Ein skiftisskipan verður gjørd, har inntøkuvøkstur landsins verður tengdur saman við minking av ríkisveitingini á fíggjarlógini. So hvørt sum inntøkur landsins vaksa, fara 50% av inntøkuvøkstrinum árliga til at minka ríkisveitingina á fíggjarlógini. 50% av inntøkuvøkstrinum verða verandi á fíggjarlógini.
- Við hesi skiftisskipan verður landsins fíggjarlóg óheft av donsku ríkisveitingini eftir fáum árum.

**Skatta- og avgjaldspolitikkur**

Føroyskir skattir og avgjøld eru fíggjarliga grundarlagið undir føroyska vælferðarsamfelagnum og tænastum landsins. Tryggjast skal, at fólkið í Føroyum fær mestu og bestu vælferð fyri hvørja skatta- og avgjaldskrónu.

Skattaskipanin skal byggja á, at vit lyfta eftir førimuni. Minni skattur verður lagdur á vanliga lønarinntøkur, og ístaðin skal skattagrundarlagið breiðkast.

*Tjóðveldi vil*

- Øll skatta- og avgjaldsskipanin verður endurskoðað og endurnýggjað.
- Ein stigvaksandi skattaskipan skal galda bæði fyri løn og pensjón, har lyft verður eftir førimuni.
- Skatturin hjá lág- og maðalløntum skal lækkast.
- Minni skattur skal gjaldast av vanligari lønarinntøku, og fólk skulu altíð hava meira eftir, enn rindað verður í skatti.
- Skapa eitt breiðari skattagrundarlag, har lutfalsliga færri inntøkur koma frá vanligari lønarinntøku, meðan lutfalsliga fleiri inntøkur koma frá inntøkum av at gagnnýta felags tilfeingi umframt frá skattum og avgjøldum, sum fyribyrgja dálking, spekulasjón v.m.
- Fíggjarligar skipanir verða settar í verk, ið eggja til nýggjar vinnur, íverksetan og skapa javnar kappingartreytir.
- Fíggjarligar skipanir verða stovnsettar, sum eggja borgarum og vinnu at leggja um til varandi orku, til reint umhvørvi og burðardygga náttúru- og tilfeingisnýtslu.
- Skatta- og avgjaldsskipanin skal gerast so gjøgnumskygd, rættvís og einføld sum møguligt.
- Býtið millum inntøkur, ið eru tengdar av virksemi, t.d. MVG, og meira støðugar inntøkur, t.d. A-skattur, skal vera soleiðis, at tryggjað verður eitt støðugt langtíðar inntøkugrundarlag.

**Tilfeingis-, vinnu- og samferðslugjøld**

Føroyar eru millum ríkastu tjóðir heimsins við náttúrutilfeingi. At fáa atgongd til at troyta eitt avmarkað tilfeingi, ið alt fólkið eigur, er ein framíhjárættur, sum eigur at vera atkomiligur eftir jøvnum kappingartreytum á einum almennum og gjøgnumskygdum marknaði. Hetta tryggjar støðugar vinnukarmar, og at tilfeingisrentan – tað virðið, sum tilfeingið kastar av sær, tá lønir, framleiðslukostnaður, íløgur og vanligur vinningur eru drigin frá – kemur øllum samfelagnum til góðar. Samferðslukervið skal fíggjast við samhaldsføstum samferðslugjaldi, ið tryggjar munagott viðlíkahald og støðugar útbyggingar.

*Tjóðveldi vil, at*

- Alment útboð og marknaðargrundað brúksgjøld skulu tryggja javna kapping, støðugar vinnukarmar og inntøkur til landið av náttúrutilfeinginum.
- Inntøkur frá brúksgjaldi av ogn Føroya fólks skulu koma øllum fólkinum til góðar – eitt nú við at lætta skatta- og avgjaldstrýstið hjá øllum føroyingum.
- Partafelagsskatturin skal eggja til burðardyggar íløgur, javna kapping og at skapa fleiri størv.
- Skattaskipanin skal sum heild stuðla uppundir at fáa fólk, fyritøkur og pening at virka í Føroyum heldur enn uttanlands.
- Støðug útbygging og viðlíkahald av samferðslukervinum verður fíggjað við rættvísum samferðslugjaldi, ið verður grundað á bæði nýtslu og samhaldsfesti.

# Fjøltáttað og nýskapandi vinnulív

**● Vinnupolitikkur ● Matkovin í Norðuratlantshavi ● Fiskivinnupolitikkur ● Alivinna ● Landbúnaður ● Ferðavinna, matstovuvinna og aðrar tænastuvinnur ● Kreativar og "nýggjar" vinnur ● Sjó-, frálanda- og oljuvinna ● Greiðar linjur millum alment og privat ● Frælsur og væl skipaður arbeiðsmarknaður**

**Vinnupolitikkur**

Aðalmál í vinnupolitikki floksins er ein fræls, fjøltáttað og nýskapandi vinna, sum kastar nógv av sær og skapar arbeiðspláss, burðardyggan vøkstur og vælferð. Allar vinnur skulu hava javnbjóðis kappingartreytir – bæði innanhýsis í Føroyum og mótvegis umheiminum.

Umráðandi er at taka burtur politiska stýring av vinnuni og einkarrættir, tvs. monopol og duopol, sum skeikla kappingina, forða fyri vøkstri og hækka kostnaðarstøðið hjá fólkinum í landinum. Dugnaskapur, førleikar, javnar kappingartreytir og virðing fyri lógarkørmum, umhvørvi og trivnaði skulu vera grundarlag undir vinnu í vøkstri.

Vitan og førleikar hjá fólkinum eru okkara fremsta tilfeingi. Fjølbroytt útbúgvingartilboð, eftirútbúgving og eitt framkomið lærdómssetur við breiðum útbúgvingartilboðum og miðvísari gransking eru tí høvuðsmotorar hjá einari nýmennandi vinnu. Vitan um náttúrutilfeingi, íverksetan og sjálvstøðugt vinnuvirksemi skulu vera partar av undirvísingini frá barnaskúla til hægri lærustovnar.

*Tjóðveldi vil*

- Gera smidligar skipanir og ráðgeving, ið ger tað einfaldari at seta virkir á stovn og at reka vinnu. Styrkja skipanir við set- og íløgukapitali.
- Stimbra íverksetaravitan í skúlunum og útbyggja íverksetaraleiðbeining kring landið.
- Tryggja kappingarføran partafelagsskatt.
- Styrkja útbúgving í náttúrutilfeingi, gransking og førleikamenning atknýtt vinnuni.
- Seta í verk skipaða útbúgving og eftirútbúgving fyri ófaklærd.
- Fáa betri umhvørvis- og góðskueftirlit.
- Hava fleiri altjóða sáttmálar og betri marknaðaratgongd.
- Útbjóðing av almennum arbeiðum á gjøgnumskygdan hátt og við javnsettum kappingarmøguleikum.
- Treytir skulu setast við almenn útboð, so virðisøking verður skapt í Føroyum, og føroyskir sáttmálar verða hildnir.
- Styrkja kappingareftirlitið, sum tryggjar rættvísa kapping og vørur og tænastur fyri kappingarførar prísir.
- KT-kervið hjá peningastovnum skal flytast aftur til Føroya sum týðandi partur av KT-infrakervinum og grundarlag undir menning av vinnuni.

**Matkovin í Norðuratlantshavi**

Føroyar eru ein matvøruframleiðandi tjóð. Í vinnupolitikkinum skal ein høvuðsdentur tí leggjast á at góðska og fáa meira burtur úr okkara náttúrugivna tilfeingi. Rávøru- og matvørumenning skal uppraðfestast, so vaksast kann um útflutningin av hádygdarvørum. Greiður politikkur fyri fiski- og alivinnuna umframt landbúnaðin skal tryggja fremstu dygd til framleiðslu, matstovuvinnu og útflutnings.

Í vinnu, sum skal kappast á altjóða stigi, er neyðugt við dyggum reglum, sum tryggja góðsku og taka umhvørvisatlit. Men lóggávan má og skal vera tillagað til føroysk viðurskifti og ikki seta órímilig ella óneyðug krøv.

**Fiskivinnupolitikkur**

Fiskivinnupolitikkur floksins hevur sum høvuðsmál, at ríkidømið í havinum verður umsitið burðardygt sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum og til frama fyri alla føroysku tjóðina. Alt tilfeingið er ómissandi ogn Føroya fólks, og tryggjast skulu javnbjóðis kappingarmøguleikar hjá fólki kring landið og størst møguligt og varandi avkast til vinnu, manningar og samfelagið alt.

*Tjóðveldi vil*

Ogn Føroya fólks

- Ognarrætturin hjá Føroya fólki til livandi tilfeingið í havinum verður tryggjaður í grundlóg og í allari lóggávu og umsiting um fiskivinnuna.
- Útlendskur ognarskapur eigur ongan rætt í føroyska veiðiliðnum. Bert fyritøkur og einstaklingar, ið hava heimsstað í Føroyum og eru fult skattskyldug í Føroyum, kunnu taka lut og bjóða seg fram at gaggnýta føroysk fiskirættindi.

Lívfrøðilig burðardygd:

- Lívfrøðiliga burðardygg stovnsrøkt verður tryggjað við at fylgja vísindaligum tilmælum, ið skulu verða lagað til tær reguleringsskipanir, sum eru í gildi, og sum skulu byggjast á fremstu vísindaligu royndir, gransking og neyva innsavning av vitan og royndum hjá teimum, ið hava rikið og reka vinnu.
- Føroyar skulu sum miðdepil í Norðuratlantshavi vera fremstar at savna, gera royndir og skjalprógva alla vitan um livandi tilfeingið í havinum, vistfrøðiligu skipanina og havumhvørvið. Havstovan fær allar neyðugar umstøður til at røkja sítt arbeiði til fulnar, og nýtt havrannsóknarskip verður bygt beinanvegin.
- Økisfriðingar, friðingar av leiðum í gýtingartíðini og friðingar av ungfiskaleiðum verða staðfestar í lóg.

Javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram at reka vinnu:

- Farið verður frá politiskari útluting av fiskirættindum, ið síðan verða keypt og seld á privata marknaðinum, til eina almenna marknaðarskipan, har veiðirættindi, tvs. fiskidagar og kvotur, verða alment boðin út sum brúksloyvi í ávísa tíð á einum gjøgnumskygdum marknaði.
- Tá ið tíðarskeiðið til brúksloyvið er av, fella rættindini aftur til landið, sum kann bjóða tey út aftur á almenna marknaðinum.
- Brúksskylda er tengd at øllum veiðirættindum. Ónýtt veiðirættindi fella aftur til landið, og ongin kann selja veiðirættindi sum privata ogn.
- Ein skiftisskipan eins og royndarskipanir verða gjørdar í samráði við vinnuna.
- Ein marknaðarskipað fiskivinna skal tryggja javnar møguleikar at bjóða seg fram hjá teimum, ið vilja reka vinnu her í landinum, at kapping verður um at fáa sum mest burtur úr hvørjum kilo, og at tilfeingisrentan ikki gerst spekulasjónsvirði, men kemur øllum samfelagnum til góðar.
- Ein "antitrust"-lóggáva verður samtykt, soleiðis at ongin einstaklingur, felag ella samtak kunnu hava brúksrætt til meira enn ávísan part av fiskivinnutilfeinginum í teimum ávísu veiðibólkunum.
- Atgongdin til tilfeingið skal skipast innan karmar, sum tryggja, at grundarlag

er fyri fjølbroyttum veiðihættum og fyri at endurnýggja og nútímansgera heimaflotan og fiskiflotan annars.

VIRÐISØKING OG MARKNAÐARFØRING

- Knýtt at brúksrættinum eru krøv um, at alt fiskatilfeingið skal førast til lands og gagnnýtast.
- Allur fiskur, ið føroysk veiðirættindi fáa til høldar, skal bjóðast út og verða atkomiligur hjá føroyskum virkjum.
- Størri virðisøking av fiskatilfeinginum skal fremjast, og stuðlast skal undir munandi meira gransking innan tilfeingisvinnurnar.
- Ein alment góðkend vrakaraskipan/góðskueftirlit verður skipað í samráð við vinnuna, sum váttar dygd og góðsku mótvegis marknaðinum.
- Fiskivinna á sjógvi og landi eiga saman við atknýttum vinnum at ganga saman í samstarv í sjóvinnutyssi, har øll vinna og stovnar, sum hava við sjógvin at gera, samstarva um átøk at gera føroysku fiskivinnuna væl skipaða, at styrkja sølulið og marknaðarføring og at tryggja váttanir fyri burðardygga veiði.

SOSIAL BURÐARDYGD

- Við lóg verður staðfest, at øll, ið reka vinnu við føroyskum fiskiloyvi og fiskirættindum, skulu fylgja sáttmálum hjá føroyskum manningarfeløgum.
- Útróðrarvinnan skal hava serliga skipan og góðar umstøður at virka og mennast kring allar Føroyar. Serlig atlit verða tikin til útróðararvirksemi, har eigarar liva av útróðri burturav.

ALTJÓÐA SAMRÁÐINGAR OG AVTALUR

- Samráðingar um rættindi uttan fyri føroyska fiskimarkið og til ferðandi og felags fiskastovnar verða skipaðar við sterkum samráðingartoymi og støðugum uttanríkispolitiskum samstarvi við onnur lond og altjóða felagsskapir.
- Føroyar taka sjálvstøðugan lut í øllum altjóða- og økisfelagsskapum, sum varða av umsiting og avtalum um fiskastovnar og fiskivinnu.
- Føroyar ganga undan at samstarva um gransking og skjalprógv fyri støðuna og gongdina hjá fiskastovnunum um okkara leiðir.

## Alivinna

Alivinnan er ein høvuðsvinna og stendur fyri alsamt størri parti av okkara útflutningsvirði. Avgerandi er at tryggja vinnuna við fjølbroyttari framleiðslu og váðaspjaðing. Virðing fyri náttúrugivnum lívfrøðiligum mørkum er avgerandi, skal vinnan framhaldandi mennast og skapa virðir og arbeiðspláss.

Miðvíst skal arbeiðast fyri at víðka alimøguleikarnar á sjógvi- og landi, so rúmd verður fyri meira aling – eisini av øðrum fiska- og djórasløgum, tara v.m.. Gjaldast skal fyri framíhjárættin at nýta firðirnar eftir tryggum og støðugum leisti, so vinnan trygt kann gera íløgur í framtíðina.

*Tjóðveldi vil*

- Tryggar karmar um støðuga og fjølbroytta aliframleiðslu.
- Gjøgnum krøv í aliloyvum og skattalóggávu tryggja, at størst møguligur partur av virðisøking og avkasti verður verandi í Føroyum.
- Nýggj aliøki verða boðin alment út.
- Tryggja, at einki útlendskt felag ella einstaklingar kunnu eiga meirilutan í nakrari alifyritøku – hvørki einsamallir ella í felag.
- Styrkja granskingarstovnin Fiskaaling og fjølbroytta gransking, sum vinnan er við til at fíggja.
- Styrkja útbúgving og eftirútbúgvingarmøguleikar innan aling við møguleika at taka BA í aling.
- Hava greið krøv og raðfesting av sjúkufyribyrgjandi rakstri við fakliga sterkum sjúku- og umhvørviseftirliti.
- At fleiri vitanarstørv verða skapt í vinnuni fyri at varðveita og bøta um kappingarførið.
- At alivinnan umframt vanligan partafelagsskatt rindar leigu-/tøkugjald til land og kommunur fyri brúksrætt til firðirnar.
- Tryggja, at vinnan ikki savnast á ov fáum hondum, so at fjølbroytt menning og váðaspjaðing verður framd.

**Landbúnaður**

Í landbúnaðinum eru víðfevndir inntøku- og menningarmøguleikar knýttir at framleiðslu, mjólkarframleiðslu, mjólkarúrdrátti, rávørum til matstovuvinnu, ull og skinn til klædnavinnu, ferðavinnuupplivingar og so framvegis. Hetta krevur, at vinnan fær eitt betri og tryggari grundarlag at byggja framtíðina á.

Bráðneyðugt er við einum landbúnaðarpolitikki, har greið mál verða sett fyri framtíðar landbúnaðin.

*Tjóðveldi vil*

- Skapa eina nútímans jarðar- og landbúnaðarlóggávu við greiðum visjónum fyri landbúnaðin.
- Seta greið mál fyri, hvørjum landbúnaðarvørum Føroyar skulu vera sjálvveitandi við.
- Styrkja útbúgvingarmøguleikar innan landbúnaðin.
- Styrkja royndir við fjølbroyttari framleiðslu, fóðurroyndum, framleiðslutøkni v.m.

- Granska og savna vitan um møguleikar fyri at framleiða plantur, grønmeti, ber o.a.
- At gransking og útbúgving á Búnaðarstovuni verður samskipað við Fróðskaparsetrið.
- Sameina útbygging av ferðavinnu og landbúnaði.
- Festibóndum verður tryggjaðir frælsir vinnumøguleikar.
- Framleiðsluskylda verður knýtt at festirættinum, so jørðin og tilfeingið annars verða gagnnýtt.
- Virknir bøndur fáa atgongd til festijørð, sum liggur órøkt ella ikki verður gagnnýtt.
- Hava greiða lendisskrá, sum tryggjar, at besta landbúnaðarjørðin verður varðveitt til landbúnað.
- Bústaðarskylda fylgir brúksrætti til jørð og lunnindi.
- Munandi átøk verða gjørd at bøta um riv, tvs. erosjón, í haganum.

**Ferðavinna, matstovuvinna og aðrar tænastuvinnur**

Føroyar hava sum ein náttúruperla í Atlantshavi bestu fyritreytir at lofta sínum parti av alheims vøkstrinum í ferðavinnu. Tí er ein framsøkin ferðavinnupolitikkur avgerandi, og við røttu átøkunum kann hetta gerast ein onnur høvuðsvinna í Føroyum, sum gevur øllum pørtum av landinum og útoyggjunum nýggjar møguleikar. Millum átøkini er ein væl útbygd tænastuvinna. Matstovuvinnan og "føroyski køkurin" við dygdarrávørum eru ein hjartasláttur í ferðavinnuni, sum hevur ríkar møguleikar og stóra menning við sær.

*Tjóðveldi vil*

- Gjøgnum avgjaldspolitikk stimbra matstovu- og ferðavinnuna og nýtsluna av føroyskum rávørum.
- Lækka mvg á matvørum og matstovuvirksemi.
- Loyva matstovuvinnuni at innflyta vín og øl beinleiðis fyri at víðka um útboðið og lækka prísin.
- Skapa einfaldari matvørulóggávu, sum gevur tryggar matvørur og stimbrar føroyska køkin og ferðavinnuna kring landið.
- Vaksa um útbúgvingarmøguleikar innan matgerð og matvøruframleiðslu og fyri tænarar, ferðaleiðarar, samskiparar v.m.
- Útbyggja skipanir, har vinnan og Ferðaráðið í felag marknaðarføra Føroyar.
- Kortleggja styrkir og avbjóðingar hjá ferðavinnu í ymisku økjunum í Føroyum.
- Seta í verk stuðulsskipan at menna serstøk ferðavinnutilboð kring landið.

- Geva mentan og list eins og fornlutum, fornminnum og søguligum plássum sjónligari leiklut í ferðavinnuni.

## Kreativar og “nýggjar” vinnur

Ídnaður og tænastuvinnur, bygdar á mentan, handverk og siðbundnar vinnur, sum ígjøgnum nýmenning verða til nýggjar vinnugreinir, draga arbeiðsmegi til sín og skapa veruligan búskaparvøkstur. Dømi um kreativar vinnur eru tónleikur, filmur, list, sniðskapan, telduspøl og mangt annað.

*Tjóðveldi vil*

- At felags átøk fyri kreativar vinnur verða samskipað í mentanar-, vinnu- og uttanríkispolitikki.
- At ein tónleika-, films, lista- og sniðgevaraháskúli verður settur á stovn.
- Samstarv og sameining ímillum kreativar, vinnuligar og handilsligar útbúgvingar.
- Íløgu- og vinnuframaskipanir, sum stimbra kreativar vinnur.
- Felags marknaðarføring av okkara ferðavinnu og kreativum vinnum úti í heimi.
- Útflutningsskipan og framsýningarpallar fyri kreativar føroyskar vinnur.
- Ein klekingardepil fyri kreativar vinnur.

## Sjó-, frálanda- og oljuvinna

Føroyar eiga at bjóða fram útbúgvingar, útgerð, tøkni, ráðgeving og fjølbroyttar tænastur til vaksandi skipaferðsluna á okkara leiðum. Sjóvinnan skal tí styrkjast og miðvíst marknaðarførast, so meira virksemi og avkast kann fáast burtur úr Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, frálandavinnuni og handilsflotanum.

Almennar inntøkur frá olju og oljuvirksemi í framtíðini skulu sum varandi inntøka umvegis Búskapargrunn Føroya. Byrgjast skal miðvíst upp fyri skeiklandi avleiðingum av einari komandi oljuvinnu, bæði búskaparliga, sosialt, mentanarliga, umhvørvisliga og í mun til aðrar vinnur.

Fremstu umhvørviskrøv skulu setast sjó- og oljuvinnuni fyri at verja fiskatilfeingið, alivinnuna og havumhvørvið, sum eru okkara lívsgrundarlag.

*Tjóðveldi vil*

- Staðfesta í grundlóg, at ríkidømið í undirgrundini er ogn Føroya fólks.
- Seta fremstu krøv til umhvørvisvernd, arbeiðsumhvørvi og trygd.
- Greiða arbeiðsmarknaðarlóggávu og sáttmálar fyri arbeiðsfólkið í olju- og frálandavinnuni.
- Seta tilfeingisrentu frá oljuvinnuni í búskapargrunn at framtíðartryggja okkara búskap.

- Støðugt eftirmeta oljuskattalóggávu eftir bestu fyridømum í grannalondum, soleiðis at rættur partur av tilfeingisrentuni kemur til høldar hjá tjóðini.
- Tryggja, at inntøkurnar koma øllum pørtum av landinum og komandi ættarliðum til gagns.
- Styrkja karmarnar og marknaðarføring av FAS og stimbra undir avleitt virksemi.
- Bjóða fram altjóða maritimar útbúgvingar.
- Marknaðarføra Føroyar sum maritiman útbúgvingar- og tænastudepil.

## Greiðar linjur millum alment og privat

Høvuðstáttur í vinnupolitikki Tjóðveldis er at hava greiðar linjur ímillum almennar og privatar uppgávur og virksemi. Almennu trivnaðarskyldunum tørvar eitt dynamiskt og sterkt vinnulív, sum kastar av sær til samfelagið. Vinnuni tørvar hinvegin ein vælvirkandi almennan sektor, ið tryggjar grundarlagið fyri at reka nútímans vinnu.

Tað, sum hevur til endamáls at skapa peningaligt avkast í kapping, eigur at skipast privat og vinnuliga, meðan tað, sum hevur til endamáls at skapa somu rættindi, trivnað, útbúgving, samferðslu, tænastur og mentan fyri øll, eigur at skipast og fíggjast við almennari, samhaldsfastari fígging – t.e. skúlar, sjúkrahús, almannatænastur, mentanarvirksemi, samferðslukervi, upplýsing, rættartrygd, eftirlit o.a.

## Frælsur og væl skipaður arbeiðsmarknaður

Ein aðaltreyt fyri vinnuligum frælsi og einum samhaldsføstum samfelag er, at vit hava ein sterkan og væl skipaðan arbeiðsmarknað. Fræls fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg, ið hava møguleikar at samráðast á javnbjóðis støði, eru grundsúlur undir væl skipaðari vinnu og rættindum hjá hvørjum einstøkum.

*Tjóðveldi vil*

- Tryggja frælsa samráðingarrættin og neyðugu amboðini hjá pørtunum og feløgunum á arbeiðsmarknaðinum at gera semjur, loysa ósemjur og tryggja síni rættindi.
- Tryggja í samstarvi við arbeiðsmarknaðarpartarnar, at grundleggjandi rættindi til arbeiðsloysisstuðul, sjúkradagpening, barsilsskipan, vanlukku- og lívstrygging, eftirløn, arbeiðsumhvørvi og -trygd, vernd móti mismuni o.a. eru ómissandi og galdandi fyri øll.
- Lóggeva ímóti allari sosialari dumping og tryggja, at allir sáttmálar á føroyska arbeiðsmarknaðinum verða hildnir á øllum fakøkjum.
- Tryggja, at útlendsk arbeiðsmegi hevur rættindi og arbeiðir eftir sáttmálum hjá feløgunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.
- Tryggja, at øll á arbeiðsmarknaðinum skipa seg í felag, og at kollektivir sáttmálar eru galdandi á øllum økjum á arbeiðsmarknaðinum.

- Geva limum í fakfeløgum somu møguleikar at gjalda limagjald skattafrítt, sum limir í arbeiðsgevarafeløgum hava.
- Stuðla samtøkum og samtakshugsan hjá fakfeløgum og vinnufeløgum - eisini í vinnuligum virksemi, handli, íbúðarbygging, fíggjartænastum o.ø.
- Eggja til, at fakfeløg og vinnufeløg taka virknan lut í øllum samfelags- og politiskum orðaskifti, upplýsingarátøkum, útbúgvingarátøkum o.ø.

# Somu rættindi – somu møguleikar

## ● Vælferðarpolitikkur ● Almenn forsorg ● Almanna- og heilsupolitikkur ● Fólkaheilsa ● Eitt samstarvandi og samanknýtt heilsuverk ● Inklusjónspolitikkur ● Barnavernd ● Eldrapolitikkur ● Pensjónsskipan ● Arbeiðsmarknaður og trivnaður ● Íbúðarpolitikkur

**Vælferðarpolitikkur**

Tjóðveldi byggir sín trivnaðarpolitikk á, at vælferð er at hava grundleggjandi rættindi til at liva eitt gott lív við sjálvbjargni og sjálvsvirðing, har øll hava mest møguliga ávirkan á egnar lívsumstøður. Vit skulu skipa okkara egnu vælferðarskipan og byggja hana á samhaldsfesti og royndir okkara sum tjóð.

Heilsuligir og sosialir trupulleikar eru í stóran mun tengdir at ójavna og sosialum fortreytum, og tí er arbeiðið at bøta um livikorini besta íløgan í framtíðar almanna- og heilsupolitikk.

*Tjóðveldi vil*

- Lógarverkið á almanna- og heilsuøkinum skal regluliga endurskoðast at tryggja gjøgnumskygdar skipanir og samsvar millum lóggávu og umsiting.
- Fátækramarkið skal tryggja, at ongin borgari í landinum livir undir ósømiligum korum.
- Serlig átøk skulu gerast fyri samfelagsbólkar, sum eru í fátækraváða – eitt nú stakar uppihaldarar og pensjónistar, sum bert hava fólkapensjón og Samhaldsfasta at dúva uppá.
- Lógarverkið skal tryggja borgarum minsta mark fyri tænastu og áseta faklig krøv til tann, sum veitir tænastuna.
- Góðskutryggja tænastuna til borgaran og tryggja, at borgarin veit, hvørja tænastu hann hevur rætt til.
- Teir altjóða sáttmálar, vit hava bundið okkum til viðvíkjandi borgaratrygd og rættindum, verða miðvíst fylgdir upp við ítøkiligum átøkum, eitt nú

mannarættindasáttmálin, barnarættindasáttmálin og ST-sáttmálin um rættindi hjá teimum, sum bera brek.

## Almenn forsorg

Endamálið við øllum fyriskipanum og hjálparráðum er at stuðla upp undir ein virknan gerandisdag, sum kann hjálpa, stuðla og menna til sjálvbjargni. Almennu fyriskipanirnar skulu virka við virðing fyri støðu hins einstaka og hava sum aðalmál at varðveita integritet og sjálvsavgerðarrætt. Fólki, sum tørvar hjálp vegna sjúku, brek, vanlukku, arbeiðsloysi, elli ella aðrar umstøður, verður tryggjað grundleggjandi rættindi til fullgóða hjálp.

*Tjóðveldi vil*

- Bøta um møguleikarnar fyri endurbúgving, vardum størvum o.s.fr. til tess at fyribyrgja, at fólk verða sett til varandi pensjónsveitingar av orsøkum, sum kunnu fyribyrgjast.
- Fátækramarkið verður brúkt sum grundarlag fyri útrokningum av almannaveitingum.
- Allir borgarar fáa ein møguleika á arbeiðsmarknaðinum.
- Nýggj forsorgarlóg og lógarverk á forsorgarøkinum verða gjørd sum skjótast.
- Frá dagsstovni í skúla og víðari á miðnám ella aðra framhaldsútbúgving verður veitt eitt samanhangandi dygdargott tilboð við støði í evnum og tilfeingi hjá hvørjum einstøkum. Har tað er neyðugt, er sernámsfrøðiligt tilboð ein sjálvsagdur partur av skúla og útbúgvingartilgongdini, og hesi tilboð eru skipað í økjum kring landið.
- Sjálvsavgerðarrætturin hjá borgarunum skal virðast. Rætturin at búgva heima sum longst við rættari hjálp ella á stovni, um heilsan bilar, er ein grundleggjandi rættur. Ongin skal vera tvungin at flyta vegna vánaliga heilsustøðu ella vantandi hjálp.
- Í almannaverkinum skulu savnað tilboð veitast í Føroyum – og ongin skal verða sendur av landinum orsakað av vantandi skipanum í Føroyum.

## Almanna- og heilsupolitikkur

Tjóðveldi vil, at støði altíð verður tikið í samlaðu lívsstøðu hins einstaka. Tí skulu fyribyrgjandi og heilsufremjandi tænastur á almannaøkinum altíð grundast á eina heildarmeting av tørvi hins einstaka við sosialum, likamligum og sálarligum atlitum.

Avvarðandi, sosiala trygdarnetið og arbeiðspláss eru týðandi lutir í tí hjálp, sum verður veitt. Málið er altíð at tryggja, at fólk ikki detta niður ímillum ráð og stovnar, men fáa hjálp eftir eini heildarmeting. Tað almenna hevur skyldu at ráðgeva og vegleiða borgarum og tryggja, at rættartrygdin verður vard. Tjóðveldi heldur, at ein virkin økismenningarpolitikkur kann fyribyrgja sosialan ójavna millum økir í landinum.

*Tjóðveldi vil*

- Skjót og røtt hjálp skal veitast grundað á nýggjastu fakligu metingar og á altjóða tilmæli.
- Borgarin er kunnaður um síni rættindi og skyldur, og at alt samskiftið við tað almenna er einfalt fyri borgaran.
- Endurvenjingar- og rehabiliteringsskipanir verða styrktar.

**Fólkaheilsa**

Fólkaheilsan og átøk henni at frama verða framd við heilsufremjandi upplýsing og ítøkiligum átøkum. Fólksliga upplýsingin um heilsu tekur støði í at fremja heilsuna og fyribyrgja teimum heilsuvandum, sum eru mest aktuellir, og endamálið er at røkka út til alt fólkið. Somuleiðis verða ítøkilig átøk, málrættað ímóti ávísum heilsuvandum og sjúkum, fyriskipað kring landið.

Tað stóra arbeiðið, sum áhugafeløg á heilsuøkinum fremja, verður virt og er týðandi partur av øllum heilsupolitikkinum í Føroyum. Borgarin eigur at uppliva, at heilsuverkið veitir eina dygdargóða og samanhangandi tænastu.

*Tjóðveldi vil*

- Psykiatriska økið skal lyftast miðvíst. Málini í ætlanini fyri heildarpsykiatri skulu fremjast – og heruppií skulu barna- og ungdómspsykiatriin og økispsykiatriin styrkjast beinanvegin.
- Átøk í kommunulæknaáliti, krabbameinsætlan, demensætlan, diabetesætlan og aðrar ætlanir verða miðvíst sett í verk.
- Kommunulæknaskipanin skal styrkjast.
- Hava betri tvørfakligt samstarv í heilsuhúsum at fremja bestu heilsutænastu til borgaran.
- Talgilda heilsuskipanin THS verður úbygd til allar stovnar og deildir undir Heilsumálaráðnum.
- Heilsutænasturnar verða útbygdar at náa øllum borgarum, so eitt nú økispsykiatri, heimatænasta og endurvenjing v.m. eru í øllum økjum.
- At heilsuverkið er virkin partur í heilsugransking, sum serliga leggur dent á serføroysk heilsuviðurskifti.

**Eitt samstarvandi og samanknýtt heilsuverk**

Allir borgarar í Føroyum skulu ókeypis hava í boði og trygd fyri fremstu fyribyrgjandi heilsuskipanum og fremstu viðgerðum – antin í Føroyum, í okkara grannalondum ella aðrastaðni í heiminum.

Føroyska heilsuverkið og sjúkrahúsverkið skulu støðugt vera samstarvandi og samanknýttar eindir og toymir – bæði innanhýsis í Føroyum og í samstarvi við

heilsuverk, sjúkrahús og granskingarstovnar í okkara grannalondum og øðrum londum, har fremsti førleikin og sakkunnleikin eru.

Starvsfólkunum í heilsuverkinum skulu útvegast betri umstøður til fakliga at samstarva, útbúgva seg, endurútbúgva seg, nýta og menna tøkni og at granska í samstarvi við fakfólk í øðrum sjúkrahúsverkum og fakligum umhvørvum. Á henda hátt kunnu fakfólkini í Føroyum virka í toymum og netverkum í øðrum heilsu- og sjúkrahúsverkum, eins og fakfólk uttanífrá virka í Føroyum.

*Tjóðveldi vil*

- Samstarvsavtalur, sum seinastu árini t.d. eru gjørdar við heilsuverk og sjúkrahús í Útnorðri, skulu støðugt útbyggjast við onnur lond.
- Føroyar skulu ganga undan at gera felags norðurlendskar avtalur.
- Føroyska heilsuverkið kann menna ávísar sergreinir og gransking og kann bjóða fram tænastur mótvegis útlondum.
- Sjúkraviðgerðir skulu takast heim, og tryggjast skal, at førleiki og umstøður eru til tess.
- Samskipan millum tey trý sjúkrahúsini og kommunulæknaskipanina skal tryggja, at bíðitíðin til viðgerðir er so stutt og nøktandi sum til ber.
- Ymisku førleikarnar í heilsuverkinum skulu verða gagnnýttir til fulnar.
- Har samferðsluviðurskiftini loyva tí, eiga funktiónir í heilsuverkinum at vera savnaðar soleiðis, at ávísar uppgávur verða loystar á einum stað, har tað við fyrimuni ber til.
- Íløgur í fremstu fjarskiftistøkni og medicoteknisk tól verða raðfestar eftir fastari fíggjarætlan.
- Møguleikarnir at fara undir læknalestur og taka partar av læknaútbúgving í Føroyum skulu mennast.
- Ílegusavnið og FarGen-verkætlanin skulu tryggja, at rættindini hjá hvørjum einstøkum verða vard í sambandi við skráseting og gransking, at føroyskir myndugleikar hava ræðið á og ábyrgdina fyri, hvussu ílegugransking fer fram, og at vit byggja upp føroyskar førleikar og draga granskarar og fakfólk úr útlondum til Føroya.

**Inklusjónspolitikkur**

Øllum børnum, ungum, vaksnum og eldri verður tryggjað nøktandi undirvísingar- og virknistilboð í nærumhvørvinum alt eftir tørvi. Føroyar skulu ganga undan at halda altjóða Barnarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek.

Tann hjálp og stuðul, sum tørvur er á, skal tí vera lógartryggjaður rættur, og familjan skal verða snúningsásin í arbeiðinum at tryggja, at børn og familjur ikki detta niður ímillum stovnar og ráð, land og kommunur.

*Tjóðveldi vil*

- Endurskoða alt økið børn og ung, so betri samskipan fæst millum tænastur.
- Nøktandi íbúðartilboð til fólk við serligum avbjóðingum.
- Sernámsfrøðin, skúlin, almannaverkið, heilsuverkið, barnagarðsøkið, barnaverndartænasturnar, stuðulsfólkaskipanir, sosialu deildirnar og aðrir fakligir samstarvsbólkar samstarva.
- Tryggjast skal, at fakfólk eru um okkara veikastu, sum ikki sjálv megna at gera vart við støðu sína.
- Tað almenna skal við lóg binda seg til at taka fólk í vard størv og arbeiðsbúgving.
- Hægri raðfesting av skúla og útbúgvingartilboðum til fólk við serligum avbjóðingum og styrkja tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.
- Útbúgvingar og eftirskúlatilboð skulu vera tøk á hvørjum ári til fólk við serligum avbjóðingum.

**Barnavernd**

Ein hin fremsta uppgávan fyri eitt framkomið land er at tryggja, at øll børn hava møguleika at vaksa upp undir tryggjum umstøðum. Tí eiga barnarverndarøkið og onnur fyrbyrging og vernd av børnum áhaldandi at verða styrkt.

*Tjóðveldi vil*

- Barnaverndarlógin verður eftirmett áleið fimta hvørt ár.
- Barnaverndartænasturnar eru framhaldandi staðsettar í økjum kring landið.
- Barnaverndarumsitingar, Barnaverndarstovan, fosturforeldraskipanin og barnaverndarnevndirnar verða skipaðar við fólki við dygdargóðum fakligum førleikum.
- Fosturforeldrum verða veittar betri umstøður og karmar.
- Familjum við serstøkum avbjóðingum verða veitt munadyggur stuðul og hjálp.
- At miðvís orka verður løgd í at fyrbyrgja kynsliga misnýtslu og annan harðskap móti børnum.

**Eldrapolitikkur**

Frælsi at velja, virka og verða vird er grundleggjandi rættur hjá øllum. Tjóðveldi vil tryggja hesi rættindi við samhaldsføstum skipanum. Spurningurin um ábyrgdarbýtið millum land og kommunur er ein spurningur um, hvussu allir føroyingar fáa somu rættindi og tilboð í eldrapolitikkinum.

Endamál við eldrapolitikkinum er, at fólk skulu hava góða lívsgóðsku alt lívið, og Tjóðveldi byggir á hugsjónina hjá Heimsheilsustovninum WHO um at ”leggja ár til lívið og at leggja lív til árini.”

Sjálvsavgerðarrætturin hjá borgarunum skal virðast. Rætturin at búgva heima sum longst við rættari hjálp ella á stovni, um heilsan bilar, er ein grundleggjandi rættur. Ongin skal vera tvungin at flyta vegna vánaliga heilsustøðu ella vantandi hjálp. Eldrarøktin eigur tí at verða veitt sum eitt fjøltáttað tilboð við tænastum, sum eru samansettar eftir tørvinum hjá einstaka borgaranum.

*Tjóðveldi vil*

- Bøta munandi um fyribyrgjandi tænastur, sum stuðla uppundir, at fólk kunnu vera sum longst í egnum heimi.
- Raðfesta munandi hægri at útbyggja heimahjálp, endurmenning, kostráðgeving, fjøltáttaðar eldrabústaðir, dagtilboð o.s.fr.
- At allar fyribyrgjandi tænastur, t.d. røktarheimsøkið, verða samskipaðar við primeru heilsutænastuna og kommunu- og landsmyndugleikarnar í øllum økjum í landinum.
- At munandi fleiri eldraíbúðir, røktaríbúðir og vardar íbúðir verða bygdar.
- At heimahjálpin og heimatænastan fáa betri játtan til at fremja grundleggjandi røktaruppgávur umframt fyribyrgjandi heimavitjanir.
- Gerandisrehabiliteringin skal fáast at virka, eins og økispsykiatriin má útbyggjast til at fevna øll økir í landinum.
- Seta tilmælini í Demensálitinum í verk.
- Raðfesta dagtilboð líka frá dagheimi og dagmiðstøð til dagtilhald.
- Raðfesta heilsufremjandi og upplýsandi átøk.

**Pensjónsskipan**

Tess minni stættarmunurin er, tess sterkari er samfelagið. Umráðandi er tí at tryggja øllum borgarum sømilig livikor í ellisárum. Allir føroyingar skulu hava grundlógarfestan rætt til góða og trygga pensjón, ið verður grundað á eina samhaldsfasta og framtíðartryggjaða skipan.

*Tjóðveldi vil*

- Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin verður bulurin í nýggju samhaldsføstu fólkapensjónini.
- Samhaldsfasta fólkapensjónin verður óheft av fíggjarlógini og løgd í skipan, ið er einføld at umsita.
- Øllum verður tryggjað ein minsta pensjónsupphædd, sum er sømilig.
- Tey, ið ikki hava aðra pensjón, fáa hægstu pensjón.
- Pensjónsskipanin skal eggja teimum, ið ynskja at arbeiða eftir pensjónsaldur, at halda fram við hesum.
- Pensjónsaldurin skal varðveitast sum ein rættur hjá øllum. Tó skal vera

møguligt hjá fólki at velja ein liðiligan pensjónsaldur: Fólk og samfelagsbólkar, ið eru niðurslitin á arbeiðsmarknaðinum, eiga at kunna velja pensjón frammanundan, meðan onnur kunnu velja seinni pensjónsaldur.

- Egnar pensjónsuppsparingar verða grundaðar á avtalur, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum samráða seg til.
- Forskattingin og ógvusliga skattingin av pensjónsinngjøldum hjá teimum lág- og miðaløntu verður broytt.
- Viðbótin til fólk, ið bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av, verður hækkað.

**Arbeiðsmarknaður og trivnaður**

Tjóðveldi ynskir ein virknan og smidligan arbeiðsmarknaðarpolitikk, sum rúmar øllum borgarum, við teirri styrki og tí ríkidømi, tað gevur samfelagnum. Arbeiðsmarknaðurin skal átaka sær grundleggjandi sosialar skyldur, og almennu skipanirnar veita grundleggjandi sosiala trygd.

*Tjóðveldi vil*

- Frælsar sáttmálasamráðingar skulu tryggja kollektiv rættindi hjá løntakarum.
- At samráðingar verða tiknar upp við fakfeløg og vinnufeløg um eitt greitt býti millum uppgávur hjá arbeiðsmarknaðinum og hjá almennu skipanunum.
- Starvsfólki verður tryggjað rættindi til ávirkan á egið arbeiðspláss.
- Rættvísa løn fyri starv, førleikar og royndir.
- Arbeiðsmarknaðurin átekur sær skyldur mótvegis umhvørvi, arbeiðsumhvørvi, vanlukkutrygging, trivnaði og eftirútbúgving hjá starvsfólkum.
- Arbeiðsmarknaðurin skapar møguleikar fyri parttíðarstørvum og niðursettari arbeiðstíð og tryggjar samstundis rættin til fulltíðarstarv.
- Arbeiðsmarknaðurin skapar møguleikar fyri vardum størvum til fólk við menningartarni ella øðrum serligum avbjóðingum.
- Ein skipaðan seniorpolitikk, har pensjónsaldur og fráfaringaraldur verða greinað.
- Arbeiðsumhvørvislógin skal fevna um allar borgarar – bæði børn og vaksin.
- Størri atlit skulu takast til sálarliga og likamliga arbeiðsumhvørvið.
- Javnstøða millum kynini er ein sjálvsagdur rættur í øllum viðurskiftum á arbeiðsmarknaðinum.
- Barsilsskipan skal fevna um allar kvinnur og menn á arbeiðsmarknaðinum og skal dagførast, so at sjálvt tíðarskeiðið verður longt, og farloyvistíðin verður meira liðilig.
- At tað almenna setir fleiri lærlingar og í stórum byggiverkætlanum tryggjar sær, at fleiri lærlingar verða settir.

**Bústaðar- og íbúðarpolitikkur**

Ræturin til at seta føtur undir egið borð er mannarættur. Tjóðveldi virkar fyri, at allir føroyingar hava rætt til egnan bústað ella býli.

Møguleiki skal vera fyri eini ringrás í íbúðamynstrinum, so eldri, ung, barnafamiljur, einstaklingar, stakir uppihaldarar, rørslutarnað o.o. hava møguleika at fáa tann bústað, sum teimum hóskar, antin tað er til leigu ella til ognar.

Íbúðartørvin hjá fólki við serligum avbjóðingum skulu kommunu- og landsmyndugleikarnir loysa í samráð við áhugafeløg, avvarðandi og við tann einstaka, sum hevur íbúðartørvin. Ræturin at verða hoyrdur og hava ávirkan á egnar lívsumstøður og egnan bústað skal virðast.

*Tjóðveldi vil*

- Húsalánsgrunnurin/Bústaðir verður høvuðsamboð í bústaðarpolitikkinum og skal taka stig til, fíggja og reka saman við kommunum, áhugafeløgum og øðrum: Leiguíbúðir, lutaíbúðir, lestrar- og lærlingaíbúðir og aðrar fjølbroyttar bústaðarmøguleikar. Harumframt skal grunnurin veita realkredittlán fyri at minka um kostnaðin á bústaðarrentuni.
- Almennar leiguíbúðir og lestraríbúðir skulu byggjast kring landið sum skjótast.
- Eitt fjølltáttað íbúðartilboð skal tryggja øllum borgarum tann bústað, ið hóskar til ta aktuellu lívsstøðu og fíggjarliga rásarúm, tann einstaki hevur.
- Íbúðarbygging, sum gevur rúm til allar borgarar, so tað skal geva eitt nú ungum lesandi, barnafamiljum, eldri og fólki við serligum avbjóðingum møguleika at búgva í somu býlingum.
- Eins góður møguleiki skal vera at búsetast á bygd og í bý.
- At kommunumyndugleikin hevur ábyrgdina av teimum, sum eru heimleys.

# Ein lærandi og vitandi tjóð

## ● Útbúgving fyri øll og lívlong læra ● Barnagarður og forskúli ● Fólkaskúli ● Eftirskúli og háskúlar ● Miðnámsskúlar ● Musikkskúli ● Altjóða lærdómssetur ● Gransking og altjóða samstarv

**Útbúgving fyri øll og lívlong læra**

Hugurin, førleikin og vitanin hjá einstaka menniskjanum eru grundvøllurin í einum og hvørjum samfelag. Útbúgving er ikki longur eitt avmarkað tíðarskeið á lívsleiðini, men fevnir um alt lívið – í arbeiði sum í frítíð. Umráðandi er, at vit síggja førleikamenning og útbúgving sum ein samanrunnan part av arbeiðslívinum.

Vit seta okkum sum mál at bjóða fólki okkara fremstu møguleikar at menna og útbúgva seg á fjølbroyttan hátt – uttan mun til fortreytir og lívsval. Øll eiga rætt til ókeypis útbúgving í Føroyum frá fólkaskúla um miðnám til hægri skúlar.

Allar okkara útbúgvingarskipanir frá barnagørðum til fólkaskúla, miðnámsskúlar og framhaldsútbúgvingar eiga at byggja á fólkaræðisligan grundvøll, har børn, ung og vaksin fáa høvi at vera virknir luttakarar, bæði við at skapa sítt egna lív og at skapa samfelagið, og verða eggjað til luttøku, samstarv og medvit um burðardygd og altjóða ábyrgd.

Barnagarðurin og skúlin skulu geva børnum og ungum møguleikar at menna síni skapandi evni, sum styrkir teirra samleika, sjálvsvirðing og sjálvskenslu. Teir eiga at birta upp undir evnini hjá børnunum og teimum ungu at taka sær av egnum viðurskiftum á virðiligan og samstarvandi hátt.

Undirstøði skúlans eigur at hvíla á upplýsing, fólkaræði og siðsemi og skal kjølfesta ungdómin til landið. Ein sterkur samleiki er fortreyt fyri at skilja og virða seg sjálvan og onnur fólkasløg og at mennast saman við teimum. Medvit um tjóðarbygging, samfelagsmenning og fólkaræði, og um at Føroyar eru lutur av heimssamfelagnum, eigur at síggjast aftur ígjøgnum alt skúlaverkið.

Útbúgvingarskipanin skal hava sterkar røtur í føroyska samfelagnum, í vinnuni, almennu stovnunum og mentanarliga umhvørvinum, og samstarva neyvt við hesi.

Undirvísingar- og frálærutilfar á føroyskum skulu miðvíst mennast á øllum undirvísingar- og skúlastigum, og fremstu amboð skulu útvegast og samskipast gjøgnum stovnin NÁM.

*Tjóðveldi vil*

- Barnagarðar og skúlar skulu skapa rúmd og lærumøguleikar fyri øll børn og ung.
- Børn og ung við serligum avbjóðingum fáa fjølbroyttar møguleikar at mennast.

- Øll útbúgvingarskipanin skal hanga saman, so tað ber til at byggja víðari á øll útbúgvingarstig.
- Umfatandi íløgur verða gjørdar í hægri útbúgving og gransking saman við miðvísari endurskoðan og samskipan av undirvísingar- og granskingarøkinum.
- Skipað samstarv skal vera millum skúla og samfelag í undirvísing, verkætlanum og vegleiðing.
- Frálærutilfar á føroyskum verður miðvíst ment og samskipað á øllum skúlastigum
- NÁM – sum hevur verið fyri munandi niðurskurði í fleiri ár – skal hava nógv hægri játtan og umstøður at útvega føroyskt undirvísingartilfar við fjølbroyttum amboðum og miðlum.

## Barnagarðar og forskúli

Barnagarðar eru mentanarstovnar á sama hátt sum fólkaskúlar, har børnini skulu fáa fjølbroyttar menningar- og mentanarligar avbjóðingar og møguleikar. Øll børn eiga at fáa møguleika at koma í barnagarð fram til skúlaaldur. Ein partur av barnagarðsuppihaldinum eigur at vera ókeypis eins og onnur skúlagongd.

Barnagarðar skulu menna og menta børnini, og innihaldið í barnagørðunum skal byggja á eina heildarfatan av barninum, har umsorgan, spæl og læra eru týdningarmiklir tættir, sum byggja á rættindi hjá børnum at hava medávirkan á egið lív.

*Tjóðveldi vil*

- Virksemið í barnagørðum byggir á virðisgrundarlag, sum er ásett í viðkomandi lóggávu og við atliti at altjóða Barnarættindasáttmálanum.
- Virksemið hjá barnagørðum skal hava eyðkennini: Virðing og ábyrgd fyri okkara felags tilfeingi, umhvørvi, náttúru, mentan, lívi og heilsu.
- Børnini skulu hava rætt og møguleika at menna síni skapandi evni.
- Javnstøða í mun til kyn, aldur, minnilutar o.s.fr eigur at síggjast aftur í øllum virksemi í barnagørðum.
- Kommunur skulu veita øllum børnum frá eitt til tvey ára aldri til skúlaaldur møguleika at ganga í barnagarði.
- Kommunur kunnu bjóða eitt forskúlatilboð.
- Námsfrøðiliga støðið á dagstovnum verður ment, m.a. við at skipa serstaka útbúgving og eftirútbúgving fyri dagstovnanámsfrøðingar.

## Fólkaskúlin

Fólkaskúlin skal støðugt nútímansgerast og mennast. Hugburðurin skal broytast, og heldur enn at børn skulu vera ”skúlaklár,” eigur skúlin at vera til reiðar at taka

ímóti øllum børnum. Hugtakið “skúlin fyri øll” skal koma inn í øll skúlalið, so børn og ung við serligum avbjóðingum fáa eins góðar møguleikar fyri dygdargóðari skúlagongd.

Fyri at tryggja samanhangandi útbúgvingargongd og dygdargott útbúgvingarstøði skal verða miðað ímóti einum alsamt tættari samstarvi millum stigini í skúlaskipanini og fakfólk teirra – t.e. barnagarðar, fólkaskúlar, miðnámsskúlar og hægri skúlar.

Lærarútbúgvingin og eftirútbúgving skulu eftirmetast og mennast við serligum atliti til at styrkja fjølbroyttar sergreinir og vallærugreinir og møguleikarnar hjá lærarum at útinna sínar fakligu, pedagogisku og sosialu uppgávur.

*Tjóðveldi vil*

- Fólkaskúlalógin skal endurskoðast og seta meira yvirskipað mál. Heldur enn sterka miðstýring skulu skúlar, skúlaleiðarar og lærarar hava størri frælsi og ábyrgd at menna skúlarnar og útinna høvuðsmálini í fólkaskúlalógini á fjølbroyttan hátt.
- Hægri útbúgving sum skúlaleiðari verður skipað.
- Spurningastýrd undirvísing, evnislæra og verkætlanararbeiði, har næmingarnir sjálvir leita sær vitan og amboð, verður framhaldandi styrkt.
- Sernámsfrøðilig ráðgeving og skúlatilboð til børn við ymsum avbjóðingum skulu styrkjast.
- Alt undirvísingartilfar í fólkaskúlanum skal vera á føroyskum.
- Málsligir førleikar eru avgerandi hjá fólki í smátjóðum. Fjølbroyttari tilboð um undirvísing í heimsmálum í framhaldsdeildini skulu skipast, og avgerðirnar um eitt nú at strika týskt sum lærugrein skal endurmetast.
- List, kreativitetur og rørsla fáa stóra rúmd sum serstakar lærugreinir og sum partur av undirvísingini í øllum lærugreinum, so kreativu evnini og hugurin til skúlan verða ment.
- Greitt ábyrgdarbýti skal vera millum land og kommunur viðvíkjandi fólkaskúlanum. Landið skal tryggja, at fólkaskúlalógin verður yvirhildin, og at øll børn í landinum fáa javnbjóðis tilboð.
- Landið skal skapa politikk á økinum, kveikja og geva skúlunum íblástur, meðan skúlarnir hava frælsi at útinna lógina og málini á sín egna hátt.
- Fólkaskúlin verður skipaður í størri samstarvseindir, so allir næmingar kring landið fáa tilboð um fjølbroytta undirvísing og ágóðan av størri sosialum samspæli.

**Eftirskúli og háskúlar**

Vaksandi tal av ungum leitar sær uttanlands til eftirskúlatilboð og háskúlatilboð. Tað hevur skund at fáa sett á stovn eftirskúla og útbyggja háskúlar í Føroyum, bæði

til føroysk ung og til ungdóm uttanlands, sum kann hugsast at koma higar á eftirskúla ella háskúla, eitt nú børn hjá føroyingum uttanlands. Eins og í fólkaskúlanum er grundarlag eftirskúlans upplýsing, fólkaræði, siðsemi og at kjølfesta ungdómin í landinum.

*Tjóðveldi vil*

- At eftirskúli sum skjótast verður settur á stovn.
- At eftirskúlatilboð eisini verða gjørd, sum eru miðað til næmingar úr útnorðurlondunum Grønlandi og Íslandi og úr Norðurlondum.
- Umframt kravdar lærugreinir skal møguleiki vera fyri at velja seg inn á ymsar breytir, eitt nú ítrótt, list, tónleik, tilfeingi, náttúru o.s.fr.
- Íverksetan eigur at verða felagsfak á eftirskúlum og háskúlum, so hugurin at nýta skapandi evnini verður styrktur.
- Land, kommunur og skúlagjøld fíggja eftirskúlan.
- Føroya Fólkaháskúli verður styrktur, og háskúlavirksemi kann skipast kring landið – innan list, ítrótt, handverk o.a.

**Miðnámsskúlar**

Samfeløg kring heimin og altjóða treytir seta alsamt størri krøv til dygdargott útbúgvingarstøði. Hugtøk sum lívlong læra og førleikamenning eru avgerandi hjá hvørjum einstøkum til tess at gagnnýta síni evnir og hava frælsi at velja sína lívsleið.

Miðnámsskúlar eru útbúgvingarnar eftir fólkaskúlan fyri tey 16-19 ára gomlu og fyri onnur, ið vilja taka førleikagevandi eftirútbúgving. Miðnámsútbúgvingarnar eru bæði yrkisrættaðar og próvgevandi og alment fyrireikandi og førleikagevandi til víðari lestur. Allar útbúgvingar, bæði yrkisrættaðar og alment fyrireikandi, skulu hava grundleggjandi, kravdar lærugreinir á ymsum støði og stigum og síni serfak og vallærugreinir. Og allar útbúgvingar skulu geva førleika til at fara undir víðari útbúgving og leggja afturat við alment førleikagevandi fakum á ymsu stigunum.

Miðnámsskúlaskipanin skal geva øllum næmingum møguleikan at velja fjølbroyttar breytir og seta sína útbúgving saman eftir tørvi og ynski.

*Tjóðveldi vil*

- Seta málið, at í Føroyum skulu í framtíðini øll ung í einum árgangi hava eina miðnámsútbúgving.
- Miðnámsøkið verður skipað í deplar kring landið, har gjørligt verður at bjóða tær ymsu útbúgvingarnar og breytirnar út eftir tørvi.
- Fleiri fjølbroyttar breytir verða mentar og styrktar.
- Skipaðar verða fleiri styttri yrkisrættaðar útbúgvingar, sum geva atgongd til hægri útbúgvingar í eitt nú matvøru, matgerð, heilsufrøði, búskap, sølu, handil, sniðgeving og innan byggi- og tekniska økið.

**Musikkskúli**

Tjóðveldi vil styrkja Musikkskúlan, so hesin hevur møguleikar at bjóða børnum og ungum dygdargóða frálæru í tónleiki frá barnagarði til miðnám.

*Tjóðveldi vil*

- Musikkskúla-Miðnám skal mennast og miðvíst styrkjast sum grundarsteinurin í fyrireikingini til víðari lestur í tónleiki.
- Tað skal bera til hjá næmingum at sameina lestur á Musikkskúla-Miðnámi við annan miðnámslestur.
- Skipast skal fyri lestri á bachelor-stigi í tónleiki í samstarvi millum Musikkskúlan og Fróðskaparsetrið.
- Stuðul verður latin, so Musikkskúlin í mestan mun kann brúka føroyskt tilfar til undirvísing í tónleiki.

**Hægri skúlar og altjóða lærdómssetur**

Nógv orka skal leggjast í at styrkja og økja um útbúgvingartilboðini á hægri lærustovnum okkara, so nógv fleiri fara undir lestur í Føroyum. Tað skal vera ein veruligur valmøguleiki hjá føroyskum ungdómi at taka partar av ella heilar útbúgvingar í Føroyum. Talan kann vera um stakgreinir, bachelor, master og Ph.D-útbúgvingar.

Fróðskaparsetrið skal støðugt menna granskingargrundaðar útbúgvingar, so tær lúka altjóða ásetingar og kunnu setast saman við útbúgvingum á øðrum universitetum. Tað skal vera møguligt og áhugavert hjá útlendingum at útbúgva seg á Fróðskaparsetri Føroya.

Eitt veruligt lestrarumhvørvi við lestraríbúðum og fjølbroyttum virksemi kring okkara altjóða lærdómssetur skal miðvíst útbyggjast.

Tann fakligi førleikin á søvnum og stovnum og í privatum fyritøkum skal gerast inngrógvin partur av undirvísing og gransking á hægru lærustovnunum.

*Tjóðveldi vil*

- Høg mál verða sett um at útbyggja hægri útbúgvingar, har okkara altjóða lærdómssetur í Føroyum kann gerast ein høvuðsdrívmegi í samfelagsmenningini, og vit samstundis kunnu skipa eina veruliga útbúgvingarvinnu.
- Fróðskaparsetur Føroya skal fáa høvi at menna serlig høvuðsmál innan altjóða útbúgving og gransking. Eitt nú kann tilfeingi í breiðari merking gerast eitt høvuðsøki, sum tvørturum nógv fak og gransking kann viðgera burðardygga tilfeingisumsiting og nýtslu, tilfeingisrætt, tilfeingisbúskap, varandi orku, sosialar og mentanarligar spurningar í tilfeingisnýtslu o.s.fr.
- Skipaður verður ein altjóða maritimur útbúgvingardepil.
- Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum verða fluttar upp á bachelor-stig. Møguleiki skal eisini vera at taka eina vinnuútbúgving eftir verandi skipan.
- Fróðskaparsetrið skal menna eina listaútbúgving, og byrjað verður við støðisári í list.

- Møguleikar fyri fjarlestri skulu økjast.
- Fjarlesturslesandi skulu hava møguleika at fáa lestrarstuðul.
- Lestrarstuðul skal framhaldandi veitast at eggja ungum at útbúgva seg allastaðni í heimi.
- Lestrarvegleiðingin og Altjóða Skrivstovan skal støðugt styrkjast, so lestrarhugað fáa holla vegleiðing um útbúgvingar- og stuðulsmøguleikar í Føroyum og uttanlands.
- Tryggjast skal, at føroyska útbúgvingarskipanin er á altjóða stigi.
- Beinleiðis avtalur skulu gerast við onnur lond og útbúgvingarstovnar um hægri útbúgvingar.

**Gransking og altjóða samstarv**

Gransking og menning geva samfelagsmenning og búskaparvøkstur. Gransking er fortreytin fyri hægri útbúgving, og vit eiga at raðfesta ta gransking, sum hevur týdning fyri samfelagið. Gransking, menning og vitanarstørv eru altavgerandi tættir í at venda gongdini við fólkaminking. Nakrar av teimum vinnum, ið eru í framgongd – og har serliga kvinnur dragast at – eru tær listarligu og kreativu vinnurnar innan sniðgeving, biotøkni, heilsufrøði og kunningartøkni. Tí eigur serlig áherðsla at verða løgd á hesi øki, tá um stuðul til gransking og menning ræður.

*Tjóðveldi vil*

- Tað almenna skal tryggja støðuga fígging til gransking og menning, sum fylgir ásetingunum hjá OECD um býti millum alment og privat fíggjaða gransking.
- Hægru lærustovnarnir, saman við øðrum granskingarstovnum og vinnulívi, skulu skapa eitt sterkt umhvørvi fyri gransking innan nøkur kjarnuøki, eitt nú náttúru, tilfeingi og tøkni; føroyskt mál, søgu og mentan; heilsu; list og nýmenning; burðardygga samfelagsmenning; orku.
- Granskarar hjá Søvnum Landsins og øðrum almennum granskingarstovnum eiga at hava undirvísingarskyldu á Setrinum.
- Hagstovan skal fáa til vega regluliga dagførd tøl fyri, hvussu nógvan pening samfelagið brúkar til gransking og menning.
- Føroyar skulu framhaldandi verða partur av evropeiskum granskingarsamstarvi.
- Gjørdar verða norðurlendskar og aðrar altjóða avtalur at góðkenna føroyskar útbúgvingarmyndugleikar sum próvmyndugleika til starvs- og útbúgvingarførleika um allan heim.
- Samstarvið skal styrkjast við aðrar smátjóðir um gransking og at menna útbúgvingar, ið hava serligt atlit at smátjóðum.

# Skapandi mentan og list

## ● Mentanar- og listapolitikkur ● Mentanar- og listaráð Føroya ● Mál og bókmentir ● Skapandi list og mentan ● Mentanarstovnar ● Tjóðleikhús og symfoniorkestur ● Bókasøvn ● Felagslív og livandi mentanararvur

**Mentanar- og listapolitikkur**

Mentan og list er at skapa, endurnýggja og viðgera felags virði í samskifti millum menniskju. Mentan og list skapa samleika og amboð at fata okkum sjálv, okkara lív, okkara søgu og samfelag og heimin kring okkum. Mentan og list bróta mørk og flyta okkum framá. Mentan og list eru grundarlagið fyri vinnu, búskapi, sosialari menning og frælsi.

Íløgur í mentan og list eru íløgur í fjølbroytni, víðskygni, framtak í fólkinum og gera Føroyar sjónligar og virknar millum aðrar tjóðir í heiminum. Mentan og list eru fremsta umboðan okkara úti í heimi og skapa inntøkur til landið – bæði í sjálvum sær og við at fremja føroyskan útflutning, ferðavinnu og skapa vinnu sum heild.

Vit vilja tí styrkja og áhaldandi menna ein dyggan og framsóknan mentanar- og listapolitikk. Eitt týðandi amboð at fremja nýhugsandi og fakliga grundaðan mentanarpolitikk er at skipa eitt óheft Mentanar- og listaráð Føroya við fjølbroyttari umboðan úr mentanar- og listalívinum.

*Tjóðveldi vil*

- Øll eiga rætt og atgongd til mentan og list.
- Sum lítil tjóð skulu vit nýta størri part av landsins fíggjarlóg til mentan og list sammett við størri lond.
- At bond og stýring ikki verða løgd á mentanararbeiði, men at tað nælir og veksur á frælsum grundarlagi
- Mentanar- og listaráð Føroya verður sett á stovn at umsita og samskipa allar stuðulsjáttanir innan mentanarøkið og ráðgeva politiska myndugleikanum.
- Játtanir til mentan og list verða munandi øktar, harímillum játtanir til týðaragrunn, miðlagrunn, filmsgrunn umframt til royndarverkætlanir og nýhugsandi verkætlanir.
- Eggjað verður til økt samstarv og nýhugsan frá dagstovnum og skúlum og út í mentanarstovnar.
- Mentanar- og listaútbúgvingar verða styrktar sum lærugreinir í fólka-, miðnáms-, eftir- og háskúlum og sum útbúgvingar á hægri skúlum.
- Høvundum, týðarum og listafólki annars skulu kunna tryggjast føst starvsløn,

umframt at teimum verða veittar góðar umstøður at inna sítt yrki.
- Listafólki verða tryggjað skipað starvs-, lønar- og eftirlønarviðurskifti.

**Mentanar- og listaráð Føroya**

Mentanar- og listaráð Føroya skal miðvíst styrkja yrkislistina, einstøku listagreinirnar , áhugalistina og skapandi mentanar- og frítíðararbeiðið kring landið. Mentanar- og listaráðið kann skipast á henda hátt við eini fyrisiting við fakkønum fólki í fulltíðar starvi:

**Mál og bókmentir**

Føroyskt mál og føroysk mentan eru styrkt við miðvísum stríði, og tey hava fótað sær ímóti øllum forsagnum í nútímans samfelagnum. Í dag standa nýggjar avbjóðingar fyri framman, har vitanar- og kunningarsamfelagið er veruleiki, og føroyingar skulu virka sjálvstøðugt í altjóða samstarvi.

Føroyskt mál skal mennast og eiga sess á øllum rongum og gerast fult samfelagsbært mál. Vit skulu kunna viðgera allar partar av tilveruni og allar samfelagstættir á føroyskum, og vit skulu kunnu taka heimin til okkara á føroyskum og læra heimsins mál og mentanir gjøgnum føroyskt.

Neyðugt er at styrkja stovnar sum Nám, Kringvarpið og Søvn Landsins, so teir kunnu ganga á odda í tí miðvísa arbeiði, sum krevst, fyri at styrkja og geva føroyska málinum og mentanini ta tign í gerandisdegnum og í framtíðini, sum tað av røttum eigur.

*Tjóðveldi vil*

- Tilmælini í álitinum ”Málmørk” verða miðvíst sett í verk.
- Høvundum, týðarum og listafólki annars skal kunna tryggjast føst starvsløn, umframt at teimum verða veittar góðar umstøður at inna sítt yrki.
- Týðaragrunnur verður settur á stovn.
- Stuðul til føroyska bókaútgávu og útgávu av teldutøkum tilfari á føroyskum verður styrktur munandi.
- Fyriskipanir fyri bókaútgávu skulu gerast liðiligari.
- Stuðulsskipanirnar skulu eisini fevna um týðing av bókmentum, filmum, spølum, telduforritum, talgildum nýtaramótum o.s.fr.
- Stuðulin til orðabókagerð og menning av orðabókatøkni og netorðabókum verður øktur.
- Føroyskum børnum uttanlands verður veitt móðurmálsundirvísing gjøgnum KT-samskifti og onnur undirvísing.

**Skapandi list og mentan**

Tjóðveldi vil virka fyri at styrkja og áhaldandi menna ein dyggan listapolitikk.

Íløgur í list og mentan eru íløgur í lívsgóðsku í einum sterkari samfelag. List eigur tí at vera atkomilig hjá øllum. Listaøkið fevnir breitt frá tónleiki, sjónleiki, bókmentum, myndlist til byggilist, handverkslist, sniðgeving umframt filmslist, sum telist millum listagreinirnar, ið hava góðar møguleikar eisini at røkka út í heim.

*Tjóðveldi vil*

- List, mentan og sangur skulu verða sjálvsagdur partur av virkseminum í barnagørðum og skúlum.
- Tryggja góðar umstøður til undirvísing í tónleiki, sjónleiki, myndlist og bókmentum.
- Geva yrkislistafólki møguleikan at hava samansett størv, so tey lutvíst undirvísa og lutvíst eru virkandi listafólk.
- Fáa til vega listabústaðir til arbeiðsbýli at hýsa listafólki avmarkað tíðarskeið.
- Orða ein politikk fyri arkitektur og styrkja byggilistina.
- Í øllum almennum byggiverkætlanum skal ávís upphædd av byggikostnaðinum brúkast til keyp og uppseting av list.
- Stuðla mentanarligari og listaligari gransking og skipanum, ið virka fyri útflutningi av føroyskari list og mentan.
- Filmsgrunnur skal setast á stovn at veita stuðul og fígging til føroyskar filmsspírar og -framleiðarar.
- Filmsgrunnurin verður so líðandi mentur til ein veruligan filmsstovn, sum skal gera tað møguligt at marknaðarføra føroyskan spælifilm úti í heimi.

## Mentanarstovnar

Mentanarstovnarnir í samfelagnum, eitt nú Søvn Landsins, hava eina sera týðandi uppgávu í samfelagnum og mótvegis borgaranum. Tí er neyðugt við greiðari og tíðarhóskandi lóggávu á savnsøkinum. Søvn Landsins eiga sum leiðandi søvn í Føroyum at fáa góð kor at arbeiða undir. Fremsta endamál teirra er at skráseta, innsavna og varðveita okkara mentanararv og á fjølbroyttan hátt at miðla teirra vitan og veita upplýsing. Mentanararvurin á søvnum má tryggjast, so hann ikki forferst, men eisini er tøkur til komandi ættarlið.

Savnsvirksemi snýr seg í stóran mun eisini um at skapa trivnað, samleika og nýhugsan millum fólk í einum virknum nærumhvørvi, so fólk kring landið kunnu skipa sín áhuga og kenna ognarskap í at reka mentanarsøguligt virksemi. Søvn Landsins hevur yvirskipaða, fakliga ábyrgd og setir karmar, men dentur skal verða lagdur á, at hugskot, átøk og søvn sprottin úr lokalumhvørvinum og frá einstaklingum merkja tað útinnandi og dagliga bygdasavnsvirksemið.

Sum tjóð í miðjum Norðuratlantshavi, sum hevur ment seg í og við náttúruni á sjógvi og landi, eiga vit at hugsa stórt á savnsøkinum. Vit eiga at menna nýggj søvn og útbyggja søvn, sum goyma og skapa vitan og gransking um ta ríku søgu, tær royndir, tað tilfeingið og tær avbjóðingar, ið vit hava.

*Tjóðveldi vil*

- Framkomið náttúrugripasavn, sjósavn, savn fyri fiskivinnu- og skipasøgu, hvalaveiðisavn o.a. skulu mennast og útbyggjast.
- Fornminnalógin verður endurskoðað og styrkt.
- Lóg fyri listasøvn verður gjørd.
- Listasavn Føroya verður lagt undir Søvn Landsins.
- Sáttmálar verða gjørdir millum Mentamálaráðið og mentanarstovnarnar, sum útgreina uppgávur og skyldur hjá stovnunum.
- Styrkja staðbundnu søvnini og mentanarvirksemið sum heild, so hesi í størri og virknari mun samstarva og virka saman við Søvnum Landsins.
- Søvnini skulu vera virkin partur i frálæruni í fólkaskúlanum og miðnáms-skúlun-um.
- Søvnini verða stuðlað, so tey kunnu taka lut í gransking innanlands og úti í heimi.
- Søvnini skulu hava møguleika at samstarva við vinnufeløg og einstaklingar.
- Stig skulu takast beinavegin við talgilding at tryggja mentanararvin, m.a. gomul dagbløð, skjøl og bandasøvn.
- Fornlutir og fornminni verða sjónligari og livandi partur av mentan og søgu okkara.

**Tjóðleikhús og symfoniorkestur**

Tjóðpallur og symfoniorkestur eru mentanarframherjar, hvørs týdningur fyri mentan, samleika og listarliga umhvørvi okkara valla kunnu yvirmetast.

*Tjóðveldi vil*

- Føroya Symfoniorkestri verða tryggjað haldført fíggjarligt grundarlag og sømilig kor at virka undir.
- Tjóðleikhús Føroya verður bygt beinanvegin, og Tjóðpallur Føroya fær styrkt fíggjarligt grundarlag.

**Bókasøvn**

Fortreytin fyri einum vælvirkandi fólkaræði er eitt upplýst og kritiskt hugsandi fólk. Her eru bókasøvn grundleggjandi stovnar. Bókasøvn eru kollektiva minnið hjá samfelagnum, sum goyma, skipa og skráseta alt, ið verður givið út. Tey útvega atgongd til vitan úr øllum heimi, og tey skapa grundarlagið fyri gransking á øllum fakøkjum. Tey eru samstundis millum týdningarmestu stovnar at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi kring alt landið.

Føroya Landsbókasavn, ið er millum elstu mentanarstovnar í landinum, skipar samstarv við býar-, bygda-, skúla- og meginbókasøvn kring landið, eisini um

stuðulsjáttan og tilfar. Tey einstøku bókasøvnini skulu hava rúmar ræsur at skapa sítt egna fjølbroytta virksemi og gerast mentanardeplar á staðnum, sum nógv góð dømi eru um.

*Tjóðveldi vil*

- Bókasøvnum verða tryggjaðar betri umstøður at bjóða borgaranum tilfar, tilboð og mentanarligar upplivingar.
- Bókasøvnini verða ment samsvarandi tøkniligu og samfelagsligu menningini og kunnu bjóða lestrarumhvørvi, fjarlestrarmøguleikar, fyrilestrar og upplivingar umvegis fjarskifti o.a.
- Landsbókasavnið skal skipa tætt samstarv um størri fólkabókasøvn kring landið við longum upplatingartíðum, faklærdum fólki og hóskandi karmum.
- Í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar vísindaligar stovnar skal Landsbókasavnið veita vísindabókasavnstænastu.

**Felagslív og livandi mentan í gerandisdegnum**

Lokalsamfeløgini eru grundarlagið undir livandi mentan. Felagslív, ítróttur, trúarlív, kvøldskúlar o.a. eru týðandi lutir í mentanararbeiðinum í gerandisdegnum. At gagnnýta náttúruna og fáast við innløgu á sjógvi og landi eru sjálvsøgd rættindi, búskaparligt ískoyti og byggir á vitan, førleikar og samstarv, sum eru ment ígjøgnum ættarlið. Hetta er samstundis grundarlag fyri trivnaði, felagsskapi og mentan.

Mentanarpolitikkurin skal tí miðvíst stuðla tí livandi felagslívinum og skapa karmar fyri at varðveita og menna siðaarvin og mentanartiltøk í gerandislívinum kring landið. Føroyski dansurin, føroysku klæðini, føroyskt bátasmið, byggilist og handverk, ull og heimavirki og matmentan eru dýrmætir partar av okkara mentanararvi, sum vit hava skyldu at varðveita til eftirkomarar okkara.

*Tjóðveldi vil*

- At skúlar, søvn, bygdahús og mentanarhús kring landið verða stuðlað sum karmar um felagslív og livandi mentanarvirksemi á bygd og í bý.
- At samstarv er millum ta livandi mentanina í gerandisdegnum og tað skipaða mentanararbeiðið, ið áhugafeløg, mentanarstovnar og listafólk útinna.
- At føroyski dansurin og kvæðaarvurin verða styrktir og stuðlaðir og fáa størri rúmd í skúlunum.
- At handverk og førleikar, ið eru ment gjøgnum øldir á ymsu plássunum, verða varðveitt og ment.
- Øll hava rætt til at útinna teirra egna trúarlív innan lógarinnar karmar, tó er føroyska fólkakirkjan ein siðbundin landsstovnur, sum framhaldandi verður rikin og stuðlað sambært løgtingslógum.

## Ítróttur

Gjøgnum ættarlið hava vit í ítrótti lært virðir, siðvenju og leikreglur. Ítrótturin er mentanarberi, samleikaskapandi, samstarvselvandi, fremjandi fyri fólkaheilsu og setir Føroyar á heimskortið. Ítrótturin kann binda okkum saman við heimin í altjóða samstarvi og er týðandi kelda til inntøkur og førleikamenning í samfelagnum.

*Tjóðveldi vil*

- Geva ítróttinum góðar og nútímans umstøður at virka undir kring landið.
- Stuðla tí stóra sjálvbodna arbeiðinum, sum er innan ítrótt, og vísa virðing fyri týdninginum, ítróttur hevur fyri einstaka borgaran og samfelagið sum heild.
- Menna breiddarítróttin kring landið, sum er mennandi, lærandi, savnandi og hevur eyðsæddan týdning fyri fólkaheilsuna.
- Gera íløgur í framkomin ítróttaranlegg.
- Stuðla úrvalsítrótt, sum hevur stóran týdning fyrst og fremst fyri ítróttafólkið sjálvt at røkka málum, men ikki minni fyri samfelagið Føroyar.
- Menna eina úrvalsskipan, sum tryggjar, at úrmælingar hava møguleika at menna seg og sína ítróttargrein á nøktandi hátt.
- Gera eina skipan, sum stuðlar miðvísum ætlanum hjá ávísum ítróttagreinum og sersambondum at røkka settum málum fyri altjóða luttøku, landsliðsarbeiði og menning av venjarum, íðkarum og hjálparfólki.
- At ítróttaháskúli, ítróttagransking og átøk fyri altjóða luttøku og førleikamenning í ítrótti verða skipað.
- Ítróttamiðnám, ítróttaháskúlar og hægri útbúgving og gransking innan ítrótt skulu mennast.
- Føroyar skulu vinna altjóða limaskap fyri øll sersambond og kunna taka lut innan allar ítróttargreinir.
- Føroyar skulu hava sjálvstøðugan limaskap í altjóða olympisku nevndini, IOC.

# Burðardyggar Føroyar

## ● Náttúru- og umhvørvispolitikkur ● Orkupolitikkur ● Grøna gullið

Føroyar eru vælsignaðar við ríkari og fjølbroyttari náttúru og orkumøguleikum. Fá lond í heiminum munnu vera so nær knýtt at náttúruni í flest øllum lívs- og samfelagslutum. Ein væl vard náttúra við lívfrøðiligum margfeldi, við heilsugóðari og reinari náttúru og við vøkrum landsløgum er ein fyritreyt, bæði fyri framhaldandi trivnaði hjá teimum, sum her búgva og fara at búgva, og eitt sterkt kort fyri vinnuna, eitt nú ferðavinnu, fiskivinnu, alivinnu og landbúnað.

Føroyar eiga at ganga undan sum ein grønur miðdepil í Norðuratlantshavi við innanhýsis átøkum og í altjóða samstarvi og krøvum.

Málið hjá okkum er, at Føroyar skulu gerast best røkta land í heiminum, har øll kenna ábyrgd fyri umhvørvinum – frá einstaklingi og húskjum til vinnu, kommunur og landsmyndugleikar.

### Náttúru- og umhvørvispolitikkur

Náttúran er viðbrekin, og í fleiri lutum er komið at mørkum. Fleiri fiskastovnar hava ilt við at endurnýggja seg, og stór øki á landi eru um at gerast oyðimerkur. Lítið verður gjørt fyri at verja lívfrøðiliga margfeldið, og nógvastaðni eru vøtn og áir dálkað. Tørvur er á skipaðum viðurskiftum og krøvum til, hvat kann innflytast av vandamiklum evnum, og á neyvum eftirliti við dálking frá hesum evnum. Náttúran verður ikki vard við føgrum orðum, og alneyðugt er at skipa náttúruverndina og umhvørvispolitikkin í Føroyum betri og greiðari.

*Tjóðveldi vil*

- Skráseting, áseting og átøk um lívfrøðiligt margfeldni sambært altjóða avtalum.
- Eina nýggja, framkomna lóggávu um náttúruvernd og náttúrufriðing.
- Havumhvørvislógin og tilbúgvingin at fyribyrgja dálking skulu styrkjast – eisini við altjóða avtalum.
- Tað skal kosta at dálka til tess at fyribyrgja dálking.
- Øll virki skulu vera fevnd av lóggávu um dálkandi virksemi.
- Ein fullfíggjað lendisskrá og lendisætlan skulu gerast fyri Føroyar.
- Serstøk lendisnevnd, sum grundar sína metingar á árinskanningar, skal góðkenna allar lendisbroytingar uttangarðs, útstykkingar, vegagerð, bygging, velting o.a..
- Eggjast skal til vistfrøðiliga landbúnaðarframleiðslu av smakkgóðum dygdarvørum.

- Reglur fyri koyring við lendisakførum í haga skulu gerast og serstøk loyvi til koyring latast.
- Virkast skal fyri at avmarka seyðabit og fyribyrgja jarðriv í viðbreknum hagalendi.
- Skipanir at skilja rusk, rotleypar at gera mold og endurnýtsla av lívrunnum burturkasti eiga at stuðlast kring alt landið.
- Lokal tiltøk við orkusparing, upplýsing og fríðkan skulu stuðlast.
- Fyribyrgja, at kemisk evni verða nýtt, sum kunnu oyða livandi verur á sjógvi og landi.
- Sett verður í verk greið kemikaliulóggáva.
- Almennir myndugleikar, stovnar og privata vinnan eiga at gera "grønar roknskapir," har umhvørvisúrslit verða grannskoðað ár um ár.

**Orkupolitikkur – grøna gullið**

Føroyar hava sera góðar náttúrugivnar fyritreytir at menna varandi orkukeldur, sum umframt fossamegi og vindorku fevnir um sjóvarfalsorku, alduorku, jarðhita, biogass, sólarorku o.a.

At gera Føroyar leysar av oljuni og sjálvveitandi við grønari orku telist millum størstu avbjóðingar í tí at framtíðartryggja búskapin. Somuleiðis eiga vit í altjóða høpi at vísa ábyrgd og luttaka í felags stríðnum at fyribyrgja veðurlagsbroytingunum. Búskaparmenning okkara eigur tí at vera bygd á grøna orku.

Fyri vinnuna er tað ein kappingarfyrimunur at kunna skjalprógva, at okkara fiskiveiða og vinna á landi er orkueffektiv og ikki lata út meira koltvísúrni, CO2, enn hægst neyðugt.

Avmarkað er, hvussu nógv vatnorkan/fossamegin kann útbyggjast uttan at skaða náttúruna. Tí skal ein greiður menningarpolitikkur fyri aðrar varandi orkukeldur vera millum fremstu raðfestingar okkara. Í øllum lutum skulu neyðug atlit at náttúruvernd verða tikin.

*Tjóðveldi vil*

- Samskipa orkuøkið í landsfyrisitingini
- Tryggja landsætlan og samstarv við høvuðselveitaran, SEV, so útbyggingar kunnu fremjast skjótt og effektivt.
- Samtykkja eina miðvísa ætlan fyri menning av varandi orkukeldum.
- Seta ferð á menningina av snildneti, smartgrid, so til ber at príssundurgreina fyri at stýra nýtslu og prísum.
- Allir almennir nýbygningar skulu vera mest møguliga orkusparandi og hitast við grønari orku.
- At orkusparingarætlan verður gjørd fyri allar almennar bygningar.

- Á fíggjarlóg landsins seta av munandi upphæddir at menna varandi orkukeldur og bjálva almennar bygningar.
- Umleggja almennar stuðulsskipanir, so tær eggja húsarhaldunum og vinnuni at spara orku og at gera íløgur í grøna hitaskipan til hús og bygningar.
- Stimbra vinnumenning innan grøna orku.
- Menna orkuútbúgvingar á Setrinum.
- Føroyar luttaka sjálvstøðugt og virkið í teirri gransking, teimum samstørvum og altjóða avtalum, sum verða gjørd millum londini um veðurlagspolitikk, minking av útláti av veðurlagsgassum og menningini av varandi orkukeldum.
- Gera okkum til áhugaverdar orkusamstarvspartnarar, har Føroyar eisini kunnu virka sum royndarøki fyri nýggjar skipanir.
- Gera skipanir, sum eggja skipum at gera íløgur í orkusparandi reiðskap og grønar orkuskipanir.
- Almenn ráðgeving um grønar orkuskipanir og bjálving skal setast á stovn.
- Lág avgjøld á el- og kombibilar skulu eggja til grøna bilnýtslu.

# Størri og samanbundnar Føroyar

**● Økismenning ● Lands- og økisætlan**
**● Samferðsla og samskifti ● Útoyggjar og smábygdir**

Samfelagsliga menningin í Føroyum er kjølfest í spjaddari búseting og livandi lokalsamfeløgum kring landið alt, har virðini, vitanin og royndirnar hjá forfedrunum eru borin víðari til næstu ættarliðini.

Trivnaður og mentanarlív í oyggjum og bygdum eru karmurin um at menna eitt fjølbroytt vinnulív, har lokalir myndugleikar, feløg, skúlar og vinna hava møguleika at samstarva og leggja felags ætlanir.

### Økismenning

Tjóðveldi leggur dent á økismenning. Bygdir og kommunur eiga at samstarva í økjum, so alt landið kann mennast í rímiligari javnvág – vinnuliga, mentanarliga og sosialt.

*Tjóðveldi vil*

- Tað almenna skal tryggja øllum borgarum sama tænastustig í t.d. telesamskifti, samferðslu og heilsu-, almanna- og skúlamálum.
- Vinnumøguleikarnir í landinum at gagnnýta felags tilfeingi skulu tryggjast.
- Ferðavinnumøguleikarnir kring landið alt verða samskipaðir.

- Kommunurnar samstarva um at átaka sær størri uppgávur.
- Ein økismenningargrunnur verður settur á stovn til tess at átaka sær part av fíggingini av vinnuætlanum í økjunum.
- Miðnámsskúlar, hægri útbúgving og gransking verða løgd í deplar kring landið.
- Mentanarstovnar kring landið verða stuðlaðir.

**Lands- og økisætlan**

Gerast skal ein lands- og økisætlan, ið ásetir, hvar í landinum ávíst virksemi eigur at leggjast – eitt nú í sambandi við oljuvinnu, orkuverk, burturkast, landbúnaðarroyndir o.s.fr.

Kommununum skal áleggjast at hava dagførdar byggi- og býarskipanarætlanir, ið seta karmar um menningina á plássinum, t.d. vinnuøki, sethúsa- og íbúðarøki, frítíðarøki, landbúnaðarøki, traðarøki o.a.

**Eitt fullfíggjað samferðslu- og samskiftisnet**

Landið skal tryggja, at allir føroyingar hava fullfíggjaðar og nútímans samferðslu- og samskiftismøguleikar:

*Tjóðveldi vil*

- Landið verður bundið saman í eina nútímans samferðslu- og samskiftiseind eftir eini raðfestari langtíðarætlan, sum er í samsvari við fíggjar- og búskaparorku landsins
- Telesamskiftisnetið skal støðugt útbyggjast, so alt landið kann gagnnýta kunningartøkni og nýggjar samskiftismøguleikar.

**Útoyggjar og smábygdir**

Útoyggjar og smábygdir hava verið fyri stórari fráflyting í sambandi við broytta samfelagsmynstrið, arbeiðsmøguleikarnar, útbúgvingarmøguleikarnar og samferðslu- og tænastukrøvini í nútíðarsamfelagnum. Men Føroyar hava ikki ráð at missa nakran blettin í landinum ella at lata ta ríku mentan, søgu, vitan og tann siðaarv og tað tilfeingið fara, sum útoyggjarnar og smábygdirnar skapa. Tær hava verið grundarlag undir, at tjóðin hevur ment seg í øldir, og eru eisini grundarlagið undir tí nútíðarsamfelag, vit øll byggja á í dag.

Útoyggjar og smábygdir eru dýrgripir fyri okkum øll – eitt nú fyri søgu, mentanararv, handverk, landbúnað, matmentan, ferðavinnu, náttúruumsiting, trivnað og mentanararbeiði sum heild.

Hóast búsetingarmynstrið og fólkatalið ikki aftur verða sum í bónda- og fiskivinnusamfelagnum, er umráðandi, at fólk býr, virkar og trívist á útoyggj og á smábygdum alt árið. Fólkið á útoyggj og í smábygdum eigur sjálvsagt at verða javnsettur partur av samfelagnum, og tær serligu avbjóðingar og teir ríku møguleikar, sum eisini lata seg upp fyri útoyggjar og smábygdir, skulu viðgerast sum eitt tjóðarmál.

*Tjóðveldi vil*

- Tilmælini í Útoyggjaálitinum frá 2001 verða tikin til nýggja viðgerð og ein raðfest ætlan samtykt fyri at fremja átøk.
- Samferðsluviðurskiftini til útoyggj og smábygdir verða bøtt beinanvegin.
- Ferðavinnumøguleikar verða miðvíst bøttir og samskipaðar.
- Náttúruvernd verður styrkt – serliga í sambandi við ferðavinnu – og úrvald pláss eiga at koma á altjóða listar yvir mentanar- og náttúruperlur, ið skulu varðveitast.
- Landbúnaðarjørðin verður neyvt skrásett, og atkomiligt skal vera hjá fólkinum á staðnum at gagnnýta jørðina og lunnindini.
- Góðkend framleiðsluhús til tilfeingi á oyggjum og í bygdum verða stuðlað.
- Handverk og útbúgving innan bátasmíð, jarnsmíð o.a. kunnu skipast og stuðlast.
- Møguleikar til seturskúla, háskúlavirksemi, skeiðsvirksemi og annað serstakt undirvísingarvirksemi alt árið eiga at skipast – og eitt nú eiga øll skúlabørn í Føroyum at hava verið á setursskúla á útoyggj og í smábygdum.
- Hølir til mentanarvirksemi, søvn og undirvísing verða stuðlað.
- Til smábygdir, sum hava tørv á smærri tunlum, keypir landið ein borivogn og hevur eitt borilið, sum við fastari játtan støðugt kann arbeiða við at bora hesar tunlar: Til Dals, Fámjins, Gjáar og Tjørnuvíkar.

# Altjóða miðdepil í Norðuratlantshavi

## ● Uttanríkispolitikkur og fullveldi ● Ein grønur miðdepil í Norðuratlantshavi ● Samgonga í Norðuratlantshavi ● Norðurlendskt samstarv ● Evropapolitikkur ● Altjóða samstarv ● Menningarsamstarv ● Trygdar- og verjumál

### Uttanríkispolitikkur og fullveldi

Tjóðveldi byggir á altjóða hugsjón og á víðfevnt altjóða samstarv. Ein av fremstu lyklunum til at skapa menning, kappingarføri, inntøkuvøkstur og vælferð er altjóða samstarv, ið vit vinna okkum sum sjálvstøðug tjóð. Fullveldi hjá føroysku tjóðini er fortreytin fyri at vinna Føroyum beinleiðis samband við allan heim og altjóða felagsskapir.

### Ein grønur miðdepil í Norðuratlantshavi

Føroyar liggja í miðjum Norðuratlantshavi. Ikki sum ein útjaðari, men sum ein miðdepil í einum øki, ið er millum heimsins ríkastu, tá ræður um náttúrutilfeingi og orku. Vit hava bæði livandi og varandi tilfeingi og haraftrat ráevni, ið ikki endurnýggja seg.

Stórveldir, lond og altjóða fyritøkur eru farin at geva Norðuratlantshavi og arktiska økinum alt størri gætur. Veðurlagsbroytingar, tørvurin á ráevnum og nýggjar siglingarleiðir norður um Norðpólin gera hetta stóra økið á jarðarknøttinum til eitt tað týdningarmesta í heiminum komandi árini. Hetta gevur Føroyum nýggjar møguleikar, men eisini stórar avbjóðingar, ið krevja miðvíst altjóða samstarv. Tjóðirnar í Norðuratlantshavi og artktiska økinum skulu sjálvar stýra og taka ábyrgd av gongdini.

*Tjóðveldi vil*

- Føroyar skulu gerast ein grønur tilfeingismiðdepil í Norðuratlantshavi, sum saman við grannatjóðum okkara megnar at umsita tað ovurstóra náttúrutilfeingið, ið er okkara, burðardygt, og sum megnar at gagnnýta og leggja um til varandi orkukeldur.

### Samgonga í Norðuratlantshavi

Fremstu samstarvsfelagar í føroyska uttanríkispolitikkinum eru útnorðurlondini Ísland og Grønland. Hóast Noreg higartil hevur kastað saman við ES í týdningarmiklum málum fyri Norðuratlantshav, eiga vit støðugt at miða ímóti at skipa eina Norðuratlantssamgongu millum Føroyar, Ísland, Grønland og Noreg.

Skotland tekur í løtuni eisini stig til at gerast sjálvstøðugt land, og tað gevur møguleika fyri, at øll okkara næstu grannalond kunnu gerast partur av eini norðuratlantssamgongu, sum tekur ábyrgd og ræði á øllum Norðuratlantshavi og arktiska økinum.

Henda nýggja Norðuratlantssamgongan skal m.a. samstarva um:

- Fríhandil
- Trygdarpolitikk og verjumál
- Sivila tilbúgving
- Umhvørvistilbúgving
- Eftirlit við sjó- og loftøki
- Skipatrygd
- Avtalur um tilfeingisumsiting og gransking í okkara tilfeingi
- Útbúgving og gransking
- Heilsumál
- Orkumál
- Ferðslu
- Samskiftiskervi og íløgur í sambond við meginlondini kring okkum.

**Norðurlandasamstarv**

Føroyar skulu gerast sjálvstøðugur limur í øllum norðurlendskum avtalum og í Norðurlandaráðnum og skulu ganga undan at styrkja tað felags norðurlendska samstarvið. Samstarvið skal støðugt víðkast til at fevna um:

- Uttanríkis- og verjupolitikk.
- Fíggjarmál og eftirlit við fíggjarstovnum.
- Rættindi hjá norðurlendskum borgarum og vinnu at virka frítt í Norðurlondum.

**Evropapolitikkur**

Tjóðveldi leggur dent á limaskap í felagsskapum og samstørvum, ið tryggja smátjóðum fólkaræðisliga ávirkan og rættin at stjórna egnum tilfeingi. Tjóðveldi tekur tí ikki undir við at Føroyar gerast limur í Evropeiska Samveldinum (ES).

*Tjóðveldi vil*

- Føroyar gerast limur í EFTA og eini EBS-líknandi skipan og á tann hátt fáa skipaða atgongd til ES-marknaðin og til útbúgvingar-, granskingar, og mentanarsamstarvið í Evropasamveldinum.

- Føroyar fáa við EFTA-limaskapi atgongd til eina røð av fríhandilssáttmálum millum EFTA og meira enn 50 lond kring heimin.

### Altjóða samstarv

Vit gerast sjálvstøðugur limur í Sameindu Tjóðum og tess stovnum og øðrum mannarættindafelagsskapum og fylgja í okkara egnu lógum og sáttmálum fremstu altjóða krøvum.

*Tjóðveldi vil*

- Føroyar gerast limaland í Sameindu Tjóðum, ST, og tess stovnum.
- Føroyar menna beinleiðis samstarv við so nógvar tjóðir sum gjørligt – mentanarliga, politiskt og búskaparliga.
- Føroyar skulu leggja dent á at tryggja mannarættindi og rættindi hjá føroysku tjóðini og øðrum tjóðum og samfelagsbólkum í heiminum.
- Føroyar virka miðvíst fyri altjóða reglum og samstarvi um havrætt, havumhvørvisvernd og burðardygga tilfeingisnýtslu.
- Føroyar stovna sendistovur í útvaldum londum og samstarva annars við Norðurlond um uttanlandsumboðan. Konslar verða settir í øðrum londum.
- Føroyar taka lut í samstarvi við aðrar smátjóðir kring allan heim.
- Føroyar fáa limaskap og virka í altjóða felagsskapum av týdningi fyri vinnu, mentan, útbúgving, gransking og altjóða virkisføri føroyinga.

### Menningarsamstarv

Føroyar skulu stigvíst røkka málunum hjá ST um, at í minsta lagi 1% av bruttotjóðarúrtøkuni skal nýtast til altjóða menningarsamstarv.

### Trygdar- og verjumál

Føroyingar eiga sum sjálvstøðug tjóð at velja og finna sín leiklut í verjuskipanini og valdsjavnvágini í Norðuratlantshavi.

*Tjóðveldi vil*

- Føroyar virka fyri friði og hernaðarligari avdubbing í heiminum.
- Føroyar og Norðuratlantshav skulu vera kjarnorkufrítt øki og hvørki hava hermegi ella herstøðir.
- Føroyar skulu taka lut í altjóða samstarvi viðvíkjandi sivilari tilbúgving, trygd á sjónum og umhvørvistilbúgving.
- Føroyar taka upp beinleiðis samband við síni grannalond og við NATO til tess at gera avtalu um skipanina av verjumálum.
- Møguligar bindingar í verjupolitiskum spurningum skulu gerast av við fólkaatkvøðu.

# Vit byggja land

## ● Tjóðarbygging ● Frá- og tilflyting
## ● Útlendingapolitikkur ● Javnstøðupolitikkur
## ● Javnstøða og rættindi hjá minnilutum
## ● Fjølmiðlapolitikkur ● Ungdómspolitikkur

Í stevnu floksins verður sagt í síðsta broti: "Tað verður at fara undir dyggiligt endurreisingarstarv og uppbyggingarstarv á øllum økjum samfelagsins, so at fólkið alt, sum her veksur upp, fær líkindi at liva við sømd í føðilandi sínum." Og hetta er áhaldandi málið í tjóðveldispolitikki.

**Tjóðarbygging**

Politikkur floksins hevur sum mál at verja samleika, mál og mentan, ið ættarlið hava bygt upp, meðan vit samstundis virka fyri menning og integrasjón tjóðini til gagns.

Søga okkara er týðandi táttur av samleika fólksins. Tí er umráðandi at tryggja dygdargóða undirvísing um stríðið fyri egnum máli og rættindum sum tjóð og eisini týdningin av at taka ábyrgd fyri egnum viðurskiftum og altjóða ábyrgd í einum sínámillum treytaðum heimi.

Okkara politikkur er tí at tryggja fólkaræðinum bestu treytir og øllum borgarum javnsett rættindi og lívstreytir.

*Tjóðveldi vil*

- Bøta um livikorini og møguleikarnar hja fólki at velja Føroyar at virka, skapa og liva í.
- Skapa tað rúmliga samfelagið.
- Tryggja pressufrælsi, talufrælsi og andsfrælsi.
- Verja og styrkja mál, mentan og søgu í skúla og samfelagnum annars.
- Verja og tryggja minnilutum rættindi.
- Tryggja teim ungu eina rødd og stimbra ungdómin at fáa áhuga fyri og vera virkin í politikki og samfelagskjaki.
- Tryggja fólkaræði, og at fólkið sjálvt hevur størst møguliga ávirkan á gerandisdagin, egið lív og lívshátt.

**Frá- og tilflyting**

At seta ferð á fólkavøksturin er eitt aðalmál floksins. Flokkurin vil í øllum virki miða ímóti at skapa tað rúmsátta samfelagið, har fjølbroytni og ymiskleiki eru ein

styrki, har skapanarevni hava frítt rásarúm. Tað dregur fólk at landinum.

Fyri at menna vælferðarsamfelagið er neyðugt av heilum huga at taka á seg avbjóðingina at rætta skeikladu fólkasamansetingina. Yngri og lærd fólk og serstakliga kvinnur skulu í nógv meira enn nú eggjast til at koma heimaftur. Virkast skal eisini fyri, at tilknýtið til føroyska samfelagið verður verandi sterkt hjá føroyingum, sum lesa og virka uttanlands.

Hetta krevur, at okkara tilfeingi verður umsitið rætt og burðardygt, so tað kastar meira av sær til samfelagið. Harumframt er eitt høvuðsmál at skapa eitt væl útbygt útbúgvingarkervi og lestrarumhvørvi, sum saman við gransking og nýmenning eru grundarlag undir einari meira fjøltáttaðari vinnu, ið kann skapa munandi fleiri arbeiðspláss.

*Tjóðveldi vil*

- Áseta mál fyri fólkavøkstri og leggja ítøkiliga strategi til at røkka málinum. Hetta fevnir um ein miðvísan vinnupolitikk við atliti at vitanarvinnum og vitanartungum arbeiðsplássum í okkara høvuðsvinnum.
- Gera munandi íløgur í fjølbroyttari og betri útbúgvingartilboð umframt lestrarumhvørvi og lestraríbúðir, so fleiri føroyingar útbúgva seg partvíst ella heilt í Føroyum.
- Stimbra íverksetan kring landið, eisini við serligum atliti at íverksetan fyri kvinnur.
- Fleiri bond ígjøgnum útbúgving og vinnulív verða knýtt ímillum føroyingar uttanlands og heimlandið.
- Barsilsskipanin verður betri, liðiligari og kappingarfør við grannalondini.
- Vinnu-, skatta- og avgjaldspolitikkur verða nýtt sum amboð at fáa prísstøðið í samfelagnum niður.
- Miðvís átøk verða sett í verk at gera tað bíligari at ferðast.
- Útbúgvin skulu hava møguleika at koma upp í ALS eftir loknan lestur, meðan tey leita sær arbeiði í Føroyum.
- Arbeiðið hjá Javnstøðunevndini skal styrkjast, so hon miðvíst fær greinað orsøkirnar og avleiðingarnar av kvinnutrotinum í Føroyum og mælt til ítøkiligar loysnir.

## Útlendingapolitikkur

Vit vilja seta í verk ein integrasjónspolitikk, ið tryggjar, at allir herbúgvandi útlendingar fáa møguleika at falla til og nýta sínar førleikar. Integrasjón av útlendingum í føroyska samfelagnum setir okkum krøv, men mennir okkum eisini sum samfelag. Føroyska málið er lykilin til fulla luttøku í samfelagnum, tí hevur tað alstóran týdning at læra málið.

Føroyar skulu taka sín lut í altjóða ábyrgdini fyri teimum, sum tørva friðskjól og vernd í øðrum landi.

*Tjóðveldi vil*

- Taka útlendingamál á føroyskar hendur og seta í verk miðvísan integrasjóns-politikk.
- Skipað verður fyri móttøkutænastu, sum skal kunna og vegleiða um rættindir og skyldur.
- Tilflytarar skulu fáa veruliga frálæru í máli, mentan og samfelagsviðurskift-um.
- Tilflytarar fáa tilboð um tillaging av útbúgving og dagføring av fakligum før-leikum.
- Børn hjá tilflytarum fáa tilboð um barnaansing.
- Tryggjað javnsett arbeiðs- og lønarviðurskifti og rættartrygd fyri allar borg-arar.
- Vit í Føroyum taka okkara kvotu av flóttafólki.

**Javnstøðupolitikkur**

Hóast batar er stríðið fyri javnstøðu millum kvinnur og menn minni enn so av. Í 2014 eru 20 ár síðan javnstøðulógin kom, men enn verður hon ikki fylgd til fulnar, og samfelagsligir ójavnar millum kynini eru eyðsýndir.

Kvinnur eru ikki eins væl umboðaðar í politisku og vinnuligu leiðslu landsins. Staðfest er, at umleið 2,9% av muninum, ið er á lønini hjá kvinnum og monnum fyri sama arbeiði, bara er grundaður á kynsmun. Kvinnur hava yvirhøvur lægri størv, lægri útbúgving og minni arbeiðstíð enn menn. Stórur partur av kvinnum hoyra til láglønarbólkin. Tað almenna er størsti arbeiðsgevari hjá kvinnum, har stórur meiriluti av kvinnum er í starvi innan heilsu, røkt, skúla, dagstovnar og sernámsøkið. Hóast talið á kvinnum á arbeiðsmarknaðinum er methøgt í Føroyum, arbeiða 60% av øllum kvinnum niðursetta tíð. Talan kann vera um tilvitað val, men umleið 20% av kvinnunum halda, at tær fáa ov fáar arbeiðstímar.

Prógvað er ferð eftir ferð, at stakir uppihaldarar eru tann bólkur, ið hevur torførast við at liva eitt sømiligt lív í Føroyum, og teir eru í stórum fátækraváða. Stórur meiriluti av støku uppihaldarunum er kvinnur, og hesar eru í vanda fyri at flyta av landinum ella ikki at flyta heim eftir loknan lestur ella arbeiði uttanlands.

Samstundis eru aðrar avbjóðingar í javnstøðumálum. Hagtøl í Føroyum og londunum kring okkum vísa, at færri menn taka hægri útbúgvingar og útbúgvingar sum lærarar, námsfrøðingar og innan røktar- og trivnaðarøkið. Og rætturin hjá børnum til bæði foreldur verður ikki munagott tryggjaður í familjurættarmálum.

*Tjóðveldi vil*

- Javnstøðulógin skal haldast fult út.
- Javnstøðulógin skal víðkast til eisini at umfata almenn partafeløg.
- Politiskir flokkar eiga at hava greiðan javnstøðupolitikk og eggjast til áset-

ingar um javnstøðu í uppstilling í bygda- og løgtingsvalum umframt javna umboðan í landsstýrinum.

- Tað almenna skal taka ábyrgd á seg sum størsti arbeiðsgevari hjá kvinnum og tryggja somu løn sum menn fyri sama arbeiði.
- Tað almenna skal tryggja rættin at arbeiða fulla tíð, og at størv verða lýst sum fulltíðarstørv, meðan undantakið er niðursett tíð.
- Hægri barnastuðul skal veitast til stakar uppihaldarar.
- Møguleikar skulu útvegast fyri bíligum bústaðum til stakar uppihaldarar og fólk við lágari inntøku
- Tænasturnar til foreldur at børnum við breki ella serligum tørvi skulu munandi betrast og samskipast.
- Átøk skulu gerast til tess at fáa menn at velja hægri útbúgving og útbúgvingar innan fakøki, har trot er á monnum.
- Bæði foreldur skulu eiga rætt og møguleika til barnsburðarfarloyvi.
- Tryggja børnum rætt til bæði foreldur og javnseta rættin hjá pápum og mammum til børn síni.

**Javnstøða og rættindi hjá minnilutum**

Javnrættur er javnvirði. Hóast einki menniskja er eins, eiga øll somu rættindi og ábyrgd í samfelagnum. Hetta uttan mun til kyn, húðarlit, átrúnað, uppruna, kærleikslív ella lívsval. Javnrættur og javnstøða tryggja samfelagnum tað sosiala og mentunarliga fjølbroytnið, ið krevst fyri alsamt at mennast. Sosialt frælsi og frælsi hjá tí einstaka skulu tí vera ein óvikandi partur av grundarlagnum undir einum sjálvstøðugum Føroyum. Minnilutabólkar eru ein sjálvsagdur partur av javnstøðupolitikki floksins.

Tjóðveldi vil, at í Føroyum verða allir minnilutabólkar og grundleggjandi mannarættindi vard. Tí má verulig orka leggjast í at skipa viðurskiftini soleiðis, at tey, sum hava serligar avbjóðingar, fáa eins góðar møguleikar at luttaka í fólkaræðinum og samfelagnum annars.

*Tjóðveldi vil*

- Lóggáva skal hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis gera mismun ella kynsmun.
- Trúarfrælsi, andsfrælsi, persónligt frælsi, talufrælsi og frælsi at skipa seg í felag eru ómissandi rættindi.
- Fólk og samfelagsbólkar skulu vera vard móti ágangi, happing og hóttanum.
- Rætturin hjá samkyndum at verða borgarliga gift verður staðfestur.
- Tryggja rættin hjá kirkjuni og samkomum til sjálv at taka støðu.
- Tryggja tinglimum og umboðum floksins rættin at taka støðu og atkvøða eftir síni egnu sannføring í etiskum málum.
- Børn í barnagarði og skúla skulu læra at skilja javnvirði og frælsisrættindi.

## Fjølmiðlapolitikkur

Ein sjálvstøðug og óheft pressa er ein av súlunum undir einum virknum fólkaræði. Miðlanir hava ovurhonds stóra ávirkan á samfelagið – medvit, samleika, mentan og fólkaræði okkara. Somuleiðis hava miðlarnir týðandi leiklut at varðveita og menna føroyska málið.

Ein fjølbroytt, saklig og kritisk pressa skal tryggja, at løggevandi, útinnandi og dømandi valdið veruliga tæna fólkinum. Tí kann fjølmiðlavirksemi ikki burturav latast upp í hendurnar á marknaðarkreftunum.

Kringvarpið eigur at verða styrkt, so tað til fulnar kann røkja sínar public-service uppgávur, sum eiga at fevna um allar samfelagsbólkar. Umstøðurnar hjá privatum miðlum at virka mugu betrast. Karmarnir kring miðlarnar og fakliga støðið mugu styrkjast, og journalistútbúgving skal setast á stovn.

Opinleiki og innlit í umsiting og fyrisitingarligar avgerðir skulu vera sjálvsagdur rættur hjá pressuni og borgarunum.

*Tjóðveldi vil*

- Føroyska samfelagið skal byggja á opinleika og rættartrygd.
- Lógin um alment innlit verður víðkað heldur enn skerd.
- Journalistútbúgving verður stovnsett, sum tekur støði í føroyska samfelagnum, viðurskiftum og móðurmálinum.
- Kringvarpið verður ment og víðari útbygt sum óheftur meginstovnur í mál- og mentanarpolitikki og sum óheftur tíðindastovnur.
- Kringvarpsgjaldið verður tikið inn umvegis skattin.
- Miðlagrunnur verður settur á stovn, har allir miðlar kunnu søkja um pening til orðaðar miðlauppgávur og –framleiðslur.
- Umstøðurnar hjá privatum miðlum sum týðandi partur í fólkaræðinum verða styrktir.

## Ungdómspolitikkur

Komandi ættarlið eru grundarlag undir tjóðini komandi, og ungdómur okkara skal hava ávirkan, ábyrgd og javnbjóðis møguleikar í samfelagnum.

Tjóðveldi hevur sum ungdómspolitiskan málsetning: Øllum ungum skal tryggjast møguleikin fyri innihaldsríkum ungdómi, ið ger tey før fyri at liva eina sjálvstøðuga og innihaldsríka tilveru við virknari luttøku í samfelagslívinum.

Hesin málsetningur skal m.a. røkkast við hesum amboðum og átøkum:

### Ávirkan og ábyrgd

Einans við at kunna taka ábyrgd og gera sær praktiskar royndir í veruliga lívinum læra tey ungu at samráðast og taka avgerðir í einum samfelag, har ið rúm skal vera fyri ymiskum hugsjónum og meiningum. Skulu tey ungu virðismeta fólkaræðisligu

virðini, mugu tey eisini hava veruliga ávirkan á teirra umhvørvi. Tey skulu hava ávirkan á skúlagongd, arbeiðstreytir, frítíð og framtíðarmøguleikar sínar.

*Tjóðveldi vil*

- Valaldurin verður lækkaður niður í 16 ár.
- Ung fáa størri ávirkan á útbúgvingvarstovnarnar.
- Ungdómsting verður sett á stovn, har politisku ungmannafeløgini stilla upp og viðgera samfelagsmál eins og í Løgtinginum.
- Kommunal ungdómsráð verða sett á stovn í kommunum kring landið.
- Kunngerð ella løgtingslóg verður smíðað, ið ásetir kravda ungdómsumboðan í almennum ráðum og nevndum, ið viðgera mál, ið viðkoma ungum, og mannagongdir fyri vali av ungu umboðunum.
- Kravd undirvísing verður í fólkaræði/samfelagsfrøði í fólkaskúlanum.

### Útbúgving og lestrarumhvørvi

Føroyar skulu áhaldandi verða kappingarførar í dystinum við grannalond okkara um ungu høvdini.

*Tjóðveldi vil*

- Skapa fjølbroyttar og breiðar útbúgvingarmøguleikar til tey ungu í landinum.
- Leggja til rættis góðar lestrarkarmar, ið skapa trivnað millum tey ungu.
- Byggja lestraríbúðir við tilknýti til útbúgvingarstovnar.
- Skapa fjølbroytt lestrarumhvørvi við mentanar-, lista- og frítíðartilboðum.

### Vinna og arbeiðsmøguleikar

Týdningarmikið er, at tey ungu hava møguleikar at gera sær arbeiðsroyndir. Fleiri megna ikki at finna fótafesti í útbúgvingarskipanini, men læru- og praktikkpláss tróta

*Tjóðveldi vil*

- Stuðulsskipan til nýútbúgvin, ið leita eftir arbeiði.
- Styrka samskiftið millum skúlar og vinnulívið.
- Nullhugsjón viðvíkjandi ungdómsarbeiðsloysi.
- Skapa góðar karmar fyri íverksetan millum ung.
- Tað almenna og tað privata binda seg til at taka fleiri lærlingar og seta praktikantar.
- Styrka og økja útbúgvingarútboðið í vinnurættaðum útbúgvingum.

### Mentan og trivnaður

Øll ung eiga at koma nøkulunda snikkaleyst gjøgnum ungdómsárini. Summi hava tørv á eini útrættari hond fyri at finna fótafesti í tilveruni. Tjóðveldi arbeiðir fyri trivnaði millum ung og ynskir at skapa optimalar karmar fyri eina sunna og fjølbroytta ungdómstilveru.

*Tjóðveldi vil*

- Fjølbroytt mentanartilboð
- Rúsdrekkafrí tilboð til ung, ið ikki sleppa inn á barrir og dansistøð.
- Áhaldandi styrkja SSP-samstarvið, tvs. samstarvið millum skúla, sosialmyndugleikar og løgreglu.
- Styrka ungdómsráðgevingina.